

ÁRSFRÁGREIÐING

# 2017-2018

TJÓÐSAVNIÐ

FAROE ISLANDS NATIONAL MUSEUM

NATURE AND CULTURE



*Stóra vindeygað á eystur-
síðuni á Múrinum*

**TJÓÐSAVNIÐ** Ársfrágreiðing 2017-2018
Lagt til rættis: Savna
Snið og uppseting: Pætur Eyðunsson Jensen / Droym
Prent og liðuggerð: Føroyaprent

Svanamerktur prentlutur 541 705

## YVIRLIT

5 Fororð
6 Seglvirkið
6 í Havn
7 Heimið karmur um handverk og skapandi evni
7 Jól á Tjóðsavninum
8 Savnið út til tín og mín
9 Savnsfagnaður í Vágunum
9 Savnsdagur á Tjóðsavninum
10 Nýggjur samleiki
12 Savnsfagnaður 2017
13 Savnsfagnaður 2018
15 Fornfrøðiligar granskingarrannsóknir
19 Fornfrøðiligar kanningar í sambandi við útbyggingar
20 Gátan um skipið í Eyðunsurð í Sandavági umsíðir loyst
21 Skráseting av krígsminnum
23 Varðveitsluarbeiðini í Kirkjubø
26 Verkætlanin at varðveita hvalastøðina við Áir
28 Nordafar og Føroyingahavnin
30 Gloria samstarvið
30 Skelti við Mølheyggjarnar
31 Kjógvagransking í Føroyum
32 Ramsarverkætlanin
33 Ringmerking
34 Biofar-tilfar heimaftur
36 Koltur – frá festi til Tjóðsavn
39 Bygdasøvn
40 Mentanarsøgulig skip
40 Vitjanir á Tjóðsavninum
41 Framsýningin í Brekkutúni
44 Skónir í Føroyum
44 Fornminni í Kirkjubø
45 Útgávur
46 Miðlan
47 Tjóðsavnið í miðlunum 2017-18
48 Norðurlendski Ríkisantikvarfundurin 2018 í Íslandi
50 Fornminnisnevndin
50 Bygningadeildin
51 Summary in English






## FORORÐ



Henda ársfrágreiðing lýsir í høvuðsheitum virksemið á savninum árini 2017 og 2018. Árið 2017 var eitt sindur sermerkt, tí um várið avgjørdi Føroya Landstýri at niðurleggja samanlagda stovnin, Søvn Landsins, og í staðin seta á stovn/endurstovna tríggjar sjálvstøðugar stovnar – Landsbókasavnið, Landsskjalasavnið, sum seinni fekk navnið Tjóðskjalasavnið, og Tjóðsavnið, ið skuldi samansetast av Fornminnissavninum og Náttúrugripasavninum. Arbeiðið at skilja sundur stovnarnar fyrisitingarliga og fíggjarliga fór í gongd beinanvegin. Tá so nýggir stjórar tóku við á nýggju stovnunum 1. august 2017, fóru stovnarnir at virka sum sjálvstøðugir stovnar, hóast formligi skilnaðurin var um ársskifti 2017-18.

Virksemi Tjóðsavnsins hesi tvey árini hevur verið umfatandi og fjøltáttað. Hetta kemst fyrst og fremst av, at økini, sum Tjóðsavnið varðar av, eru sera mong. Á náttúruøkinum eru tríggjar deildir: Djór í sjónum, Djór á landi og Plantudeildin. Harumframt er granskingin av havsúgdjórum staðsett á Tjóðsavninum. Á mentanarøkinum eru somuleiðis tríggjar deildir: Fornfrøðideildin, Fólkalívsdeildin og Bygningadeildin. Afturat hesum deildum hava vit ein bólk av starvsfólki, sum miðlar virksemi savnsins við undirvísing, útgávum, framsýningum og tiltøkum.

Allar deildir hava hvør á sínum øki sum høvuðsuppgávu at savna inn, skráseta, granska og miðla arbeiði teirra, men eisini at taka sær av bundnum myndugleikauppgávum.

Tjóðsavnið arbeiðir eisini við tveimum serstøkum verkætlanum, sum hava fingið beinleiðis játtan á fíggjarlógini í 2017 og 2018. Tær eru Múrurin og fornminnini í Kirkjubø og hvalastøðin við Áir. Hesar verkætlanir eru ikki lidnar enn, men halda fram komandi árini.

Starvsfólkini á Tjóðsavninum arbeiddu saman við serkønum fólkum við einum nýggjum grafiskum samleika til stovnin veturin 2017-18. Burtur úr hesum arbeiði spurdist eitt nýtt búmerki og ein nýggj heimasíða. Nýggi samleikin var almannakunngjørdur 16. mars 2018 á stórari móttøku í framsýningarhølum Tjóðsavnsins í Hoyvík. Í sambandi við móttøkuna var høvið nýtt til at greiða frá virksemi savnsins og frá størri ætlanum fyri framman.

Á miðlanarøkinum hevur Tjóðsavnið verið sera virkið seinastu tvey árini. Upplatingartíðirnar eru broyttar, soleiðis at savnið hevur meira opið halgidagar og um vikuskiftini. Fleiri serframsýningar hava verið m.a. framsýningarnar “Seglvirkið í Havn” og “Heimið”. Tjóðsavnið gav í 2018 tvær bøkur út. Onnur var “Skónir í Føroyum” eftir Onnu Mariu Fosaa, sálu, og hin var “Fornminnini í Kirkjubø” eftir Símun V. Arge. Seinna var útgivin á fýra málum.

Vitjanartølini hava verið vaksandi seinastu tvey árini. Serliga í 2018. Hetta kemst helst av økta ferðafólkastreyminum til Føroya, men eisini talið á føroyskum vitjandi er økt munandi. At talið á føroyskum vitjandi somuleiðis er økt, er helst ein avleiðing av økta framsýningarvirksemi savnsins.

Vón okkara er, at lesarin við hesi ársfrágreiðing fær eitt gott innlit í spennandi, neyðuga og sera fjøltáttaða virksemið á Tjóðsavninum.

**Herleif Hammer**
*stjóri*

*Tørkan er eitt av húsunum í hvalastøðini við Áir. Her varð mjøl og tøð framleitt*



*Høgni og Leivur á Seglvirkinum*





*Anna Maria og Niels á Heiðunum*

# SEGLVIRKIÐ Í HAVN

Fyri nøkrum árum síðani fekk Tjóðsavnið alt, sum var á Seglvirkinum í Havn í varðveitslu og til ognar. Hetta virðismikla og rúgvismikla tilfar varð skrásett alt fyri eitt, men lá leingi í goymsluni til farið varð undir at fyrireika framsýningina *Seglvirkið í Havn – The Sailmaker in Tórshavn*

**Seglmakarin Niels Nielsen**, Niels í Heiðunum, var fiskimaður og skipari og giftist til Havnar. Kona hansara, Anna Maria, vanliga nevnd Mia, fødd Arge, seymaði føroysk fløgg til fiskiskip undir krígnum og helt fram at seyma fløgg inn í 1960-árini. Ein sonur teirra var Leivur. Hann lærdi hjá pápanum og gjørdi sveinastykkið í Keypmannahavn í 1948. Har var nóg mikið at gera, bæði segl, presendingar og mangt annað.

Seglvirkið hjá Nielsi og Leivi varð sett á stovn í 1949 sum partafelag, og feðgarnir seymaðu segl heima í kjallaranum í Tórsgøtu.

Niels í Heiðunum gekk undan at stovna Sluppgrunnin í 1962, sum í 1967 keypti Westward Ho frá fyritøkuni T.F. Thomsen á Tvøroyri. Niels og Leivur vóru uppií at varðveita og seta sluppina í stand.

Tað var Svanhild Nielsen, einkjan eftir Leiv, sum hevði Seglvirkið í sínari varðveitslu, og hon skipaði fyri, at savnið fekk alt í varðveitslu og til ognar – amboð og útgerð, seglbeinkir, kósir, blokkar, seymimaskinur, saksar, passarar, mátibond, nálir og eskjur, bíleggingarbøkur, tekningar og uppmátingar av seglum, seglkort, bøkur o.m.a.

Í sambandi við Mentanarnáttina 2018 stóð framsýningin fyrst uppi í Aulini í Finsen í døgunum 1.-10. juni. Síðani stóð hon í framsýningini hjá Tjóðsavninum fram til 15. septembur 2018.




*Plakat*

# Heimið karmur um handverk og skapandi evni



*Rannvá Winkler setti framsýningina*

**Í 2018 kundi Fuglafjarðar kommuna hátíðarhalda sín 100 ára dag. Í hesum sambandi lat Tjóðsavnið serframsýning upp við heitinum "Heimið, karmur um handverk og skapandi evni" í Betri bygninginum í Fuglafirði**

**Endamálið við serframsýningini** var at varpa ljós á fornfrøðiligan útgrevstur á staðnum, ið var tíðarfestur til víkingaøld, og at vekja áhuga fyri hesi spennandi øld í bygdini.

Framsýningin lat upp í sambandi við Mentanardagarnar í Fuglafirði í septembur, og møguleiki var at vitja framsýningina fram til 21. oktobur. Framsýningin var sera væl móttikin av fuglfirðingum, skúlum í økinum og útlendskum ferðafólki – í alt 414 fólk vitjaðu. Serframsýningin, ið lýsti víkingatíð, hevði eisini eitt tjóðsøguligt miðlanarvirði, og stóð tí eisini á Tjóðsavninum í novembur 2018.



Vit eru sera takksom fyri gott samstarv við Fuglafjarðar kommunu og møguleikan, vit fingu at sýna fram.

*Amboðini hjá Sverra Dahl vóru eisini partur av framsýningini*



# JÓL Á TJÓÐSAVNINUM

**Sunnudagin 2. desembur 2018 lat Tjóðsavnið hurðarnar upp fyri jólahugna. Vit "pakkaðu" virði sum endurnýtslu, munnliga frásøgn, heimagjørdar jólagávur, samskifti og samveru millum ættarlið inn í eina jólaliga skrá**

*Nostalgisk jól ... minnist tú?* var heitið á jólaframsýningini, ið sýndi fram lutir við endamálinum at vekja nostalgisku kensluna og fáa jólaminnini fram. Í Hoyvíksgarði var jólashýrurin av sonnum komin í húsið! Har var kynt upp við torvi í komfýrinum, rúmini angaðu av kardamummu, heimagjørt jólatræ stóð í fínustovu og jólastásið var funnið fram. Her var ein øðrvísi jólafriður og møguleiki at uppliva eina tíð, áðrenn blunkandi jólaperur, Facebook, wifi og jólares, sum vit kenna tað í dag.

Jólatiltakið var sera væl vitjað, 166 gestir í alt. Serliga jaligt var at síggja, at fleiri nýggj vitjandi vóru at síggja millum allar jólagestirnar.

*Fleiri gamlar slettur vóru á framsýningini*



# SAVNIÐ ÚT TIL TÍN OG MÍN

Ígjøgnum eina skrásetingarskipan eru Sjódjóradeildin, Landdjóradeildin og Plantudeildin ávegis at røkka út til allar føroyingar við at geva atgongd til alla sína vitan um dýr og plantur í Føroyum

**Síðani Náttúrugripasavnið í 1955** varð stovnað við søvnum frá privatfólki – harímillum var plantusavnið hjá Rasmus á Háskúlanum, Herbarium Faeroense, firvaldasamlingin hjá Leif Dahl og fulglasavnið hjá Niels á Botni – er eitt alsamt størri og meiri umfevnandi skrásetingararbeiði farið fram.

Stovnurin hevur síðani byrjan virkað sum ein stovnur, ið stendur fyri vísindaligari skjalfesting av náttúrusøguligum lutum og eygleiðingum, m.a. við at hava staðið fyri fleiri granskingarverkætlanum ígjøgnum árini. Millum annað kunnu nevnast plantufrøðikanningarnar hjá Kjeld Hansen árini 1961-1962, sum komu út í bók 1966, pollenkanningarnar av vakstrarsøguni hjá Jóhannes Jóhansen, stóru grindakanningarnar í 1980unum, sum Dorethe Bloch stóð fyri, og stóru Biofar kanningarnar um djóralívið á havbotninum kring Føroyar. Alt tilfarið frá hesum granskingarverkætlanunum er nú í varðveitslu á Tjóðsavninum undir Jan Sørensen savnsvørði á Sjódjóradeildini, hjá Leivi Janusi Hansen, savnsvørði hjá Landdjóradeildini, og hjá Magnusi Gaard, savnsvørði á Plantudeildini.



Dýr á goymslu á vátsavninum í Kaldbak

## SPECIFY OG GBIF

Skrásetingarnar gerast fleiri, tí við broyttu tíðunum og framkomnu tøknini er tað vorðið nógv lættari at taka myndir, upptaka ljóð o.s.fr. Sum ein natúrlig avleiðing av hesum, hava søvnini tikið eina talgilda skrásetingarskipan í nýtslu, sum eitur Specify. Specify er vald, tí hetta er skipanin, sum onnur søvn runt um í heiminum brúka, og tí at við hesari skipan ber til at fáa sum mest burtur úr dýrabara vísindaliga skrásetingararbeiðinum, sum søvnini liggja inni við.



Við hesari skipan ber eisini til at flyta søvnini út til øll at brúka. Hetta ber til, tí at við Specify-skipanini fáa søvnini flutt sínar dátur til aðrar skipanir. Eitt tað fyrsta, sum verður gjørt, er at flyta dáturnar til *Global Biodiversity Information Facility (GBIF)*. Á www.gbif.org ber til hjá einum og hvørjum at leita fram upplýsingar um eitt nú Føroyar, sum fram til nú bara hava verið at funnið á skjalagoymsluni hjá Tjóðsavninum.

## VIÐKOMANDI VITAN

Við hesari skipan ber til hjá Tjóðsavninum at deila vitan, ið liggur inni í søvnunum. Søvnini á Tjóðsavninum eru hjartað í sjálvum savninum, og Tjóðsavnið hevur arbeitt fram ímóti einari loysn, har sum mest fæst burtur úr hesum goymslunum, og at hetta verður sjónligari hjá øllum føroyingum. Harafturat er vitanin, sum liggur her – bæði tann søguliga og nýggj vitan – so viðkomandi í dag, tí sera nógv plantusløg og djórasløg doyggja út, og tí er lívfrøðiliga margfeldið í dag hótt. Við GBIF er hendan vitanin samlað úr øllum londum, og er hetta bæði sera umráðandi fyri granskingina og hent fyri almenningin.

At fáa skrásett øll søvnini á Tjóðsavninum í Specify er serstakliga rúgvismikið og tíðarkrevjandi arbeiði. Hóast hetta, so eru allir útstappaðu fuglarnir og skordýrini, ið standa á nál, eru skrásett. Harumframt eru allar plantúrnar í samlingini hjá Rasmusi á háskúlanum skrásettar í Specify, og arbeitt verður miðvíst fram ímóti at fáa allar samlingarnar skrásettar í Specify og so fluttar yvir í GBIF so hvørt, sum hetta ber til. Tá verður laga manni hjá tær og mær at finna upplýsingar um alt, sum søvnini á Tjóðsavninum hava í varðveitslu til gleði og gagns fyri øll áhugað.

*Meiri kann lesast um Specify á www.sustain.specifysoftware.org*



# SAVNSFAGNAÐUR Í VÁGUNUM



*Chester Camp – Loftmynd frá 1958*

**Bygdasøvnini í Vágum skipaðu fyri Savnsfagnaði dagarnar 20. til 22. apríl 2018. Tiltakið var býtt í tveir partar, har annar var fyri innboðin og hin fyri almenningin**

**Endamálið við Savnsfagnaðinum** var at savna alt savnsumhvørvið í Føroyum til fakliga og sosiala samveru, og at sýna fram fyri almenninginum teir møguleikar og ætlanir, sum eru í Vágum innan savnsøkið, mentan og innan ferðavinnu.

Savnsfagnaðurin var samansettur av framsýningum, framførslum, fyrilestrum og túrum til gongu og við bussi. Hóast miðdepilin var høllin á Giljanesi, vóru hópin av tiltøkum kring alla oynna.

Tjóðsavnið var eisini við til Savnsfagnaðin. Umframt at vera væl umboðað til tiltakið fyri innbodnum, hevði savnið eisini ein bás í høllini á Giljanesi, har evnið var kríggsminni í Vágum. Helgi D. Michelsen hevði í hesum sambandi framløgur um arbeiðið at skráseta kríggsminnini í Vágum. Framløgurnar vóru tríggar – ein hvønn dagin, ið tiltakið vardi.



*Básurin hjá Tjóðsavninum*

# Savnsdagur á Tjóðsavninum

Saman við Listasavni Føroya varð skipað fyri savnsdegi í Brekkutúni 23. mars 2017. Savnsdagurin varð fingin í lag í sambandi við, at Etiskar reglur um søvn hjá altjóða savnssambandinum, International Council of Museums, ICOM, komu út á føroyskum í desembur 2016

**Dagurin var fyri tey**, sum varða av søvnum í Føroyum, sum hava savnsvirksemi og fáa stuðul ella fígging frá tí almenna. Rigmor Dam, landsstýriskvinna í mentamálum, setti dagin við røðu um týdningin at hava søvn og um virksemið hjá ICOM, sum er skipað sambært hugsjónum hjá UNESCO, har ið Føroyar hava atlimaskap. Somuleiðis nevndi landsstýriskvinnan týdningin at menna søvnini í Føroyum, um altjóða virðing, at savnsvirksemið í Føroyum er grundað á júst leiðreglurnar hjá ICOM, og harnæst leiklutin hjá ICOM at stimbra og verja náttúru- og mentanararvin.

Formaðurin í tjóðarnevndini hjá ICOM Danmark, Søren la Cour Jensen, var komin til landið og greiddi frá, hvussu føroyska útgávan av teimum etisku reglunum varð komin í lag og síðani, hvussu ICOM er skipað í millumtjóða samstørv, um altjóða nevndir, sum virka innan tey mongu serøkini á søvnum, og um grønlendska og føroyska umboðan í donsku tjóðarnevndini, sum aðalfundurin tók undir við í 2016.

Nils Ohrt, stjóri á Listasavninum, hevði framløgu um, hvussu tær etisku reglurnar virka í verki. Hákun Andreasen á Tjóðsavninum greiddi frá SARA, sum er nýggja miðskráin hjá danska Slots- og Kulturstyrelsen, og sum eisini fer at verða brúkt av grønlendskum og føroyskum søvnum. Súsanna Joensen á Tjóðsavninum vísti runt í goymsluni í Brekkutúni og greiddi frá grundreglum fyri varðveiting av savnsgripum.

Luttakararnir skiftu orð um onnur felags viðurskifti á savnsøkinum, eitt nú, hvussu smærri søvn kunnu samstarva í framtíðini. Bæði landssøvn og landsgóðkend bygdasøvn tóku fjølment lut á savnsdegnum.

Andras Mortensen hevði stílað fyri hesum arbeiðinum saman við donsku ICOM tjóðarnevndini.

# NÝGGJUR SAMLEIKI

**Í sambandi við at Søvn Landsins eru farin í søguna, er Tjóðsavnið vorðin sjálvstøðugur stovnur við egnum navni, samleika og endamáli. Hósdagin 15. mars 2018 var stór almenn móttøka í framsýningarhølum Tjóðsavnsins í Hoyvík**



Rigmor Dam, landsstýriskvinna




Allan Dalsgarð frá lýsingarfyritøkuni Savna

**Tiltakið byrjaði við**, at Rigmor Dam, landsstýriskvinna í mentamálum, helt røðu. Síðani avdúkaði Allan Dalsgarð frá lýsingarfyritøkuni Savna nýggja búmerkið og nýggju heimasíðuna. Hann greiddi samstundis frá hugsanunum aftanfyri nýggja samleikan, sum er eitt úrslit av samstarvi millum serfrøðingar frá lýsingarfyritøkuni Savna og starvsfólk á Tjóðsavninum.

'Tjóðsavnið' er navnið á nýggja stovninum, sum savnar, granskar og miðlar vitan um føroyska náttúru, mentan og søgu.

Í sambandi við móttøkuna nýttu leiðsla og starvsfólk høvið at greiða frá arbeiði teirra og um spennandi framtíðarætlanirnar hjá stovninum. Herleif Hammer, stjóri, greiddi stutt frá ætlanunum á fýra økjum. Tær vóru Skansin í Havn, hvalastøðin við Áir, Koltur og ætlan um nýggja fasta framsýning um grind. Erland Viberg Joensen, leiðari á fólkalívsdeildini, kunnaði um serframsýningina 2018, Seglvirkið í Havn. Helgi Michelsen, leiðari á fornfrøðideildini, hevði framløgu um grevstrarnar á Velbastað og Heima á Sandi. Símun V. Arge greiddi frá, hvussu langt komið var við varðveitsluarbeiðinum av Múrinum og øðrum fornminnum í Kirkjubø. Janus Hansen, leiðari á deildini fyri djór á landi, greiddi stutt frá verkætlanini við ringmerktum kjógvum, og Bjarni Mikkelsen lýsti støðuna hjá hvalagranskingini.

Umleið 150 fólk komu til móttøkuna, sum endaði við kórsangi og einum drekkamunni.









Herleif Hammer, stjóri, greiður frá spennandi framtíðarætlanunum hjá Tjóðsavninum




# SAVNSFAGNAÐUR 2017

*Sóleyð Danielsen, sjónleikari og leikstjóri*

ST lýsti árið 2017 sum "ár fyri burðardyggari ferðavinnu". Vit valdu tí, at okkara evni til Savnafagnaðin skuldi vera "vitjandi". Tað dekkar ferðavinnu í egnum landi og eisini náttúruna, har okkara flytifuglar vitja aftur hvørt ár

**Tiltakið var sum vant** í heystfrítíðini 9. - 13. oktobur, allar dagar frá klokkan 11 - 16. Á skránni vóru uppgávur, sjónleikur og frásagnir. Uppgávurnar vóru skipaðar í einum hefti, ið varð prentað til tiltakið. Nakrar av uppgávunum vóru tengdar at framsýningunum og skuldu loysast á staðnum, meðan aðrar kundu loysast aðrastaðni, um tey vitjandi tóku heftini við sær.

## DAGSINS FRÁSØGN

Hvønn dag vóru frásagnir, har starvsfólk frá Tjóðsavninum ella Jarðfeingi tosaðu um eitt ávíst evni, ið hevði nakað við vitjandi at gera.





### Dagsins frásøgn 2017

**Mánadag:** Hvat hava útlendingar sagt um okkum? – Erland V. Joensen
**Týsdag:** Djór koma flúgvandi og fúkandi til Føroya – Leivur Janus Hansen
**Mikudag:** Skotskur ferðamaður í Føroyum leitaði eftir vøkrum tinnum og stríddist við sjórænarar – Lis Mortensen*
**Hósdag:** Vitjandi skapa ófrið og kaos í 1808 – ein knappur lá eftir – Helgi Michelsen
**Fríggjadag:** Avgusturin, sum vitjaði og brast – Jan Sørensen

**Lis Mortensen fekk forfall, so frásøgnin mikudag var tiverri av ongum*

## MÚSIN OG TÝSKARIN

Sjónleikur var á skrá hvønn dag klokkan 13. Men av tí at áhugin var so stórur, var avgjørt at hava tvær sýningar hvønn dag soleiðis, at frá týsdegnum var eisini ein sýning klokkan 15. Sjónleikurin kallaðist "Músin og týskarin" og var um stríðið í miðøld um dómkirkjuna í Kirkjubø, ið vit í dag kenna sum Kirkjubømúrin. Hetta var einmansleikur sýndur í hølinum við Kirkjubøstólunum. Sóleyð Danielsen hevði skrivað leikin og framførdi sjálv. Áskoðaratalið var avmarkað til 30 børn við foreldrum. Atgongumerki fingust ókeypis í móttøkuni. Fullsett var til allar sýningar.

## KAPPING

Hvønn dag var endað við lutakasti um eina familjuferð út í Koltur. Fyri at vera við í kappingini, skuldu tey vitjandi útfylla ein lutaseðil. Fimm familjur vunnu sostatt rættin til ferðina. Farið var út í Koltur í tveimum, 2. og 9. juni.

Vitjanartalið fyri Savnsfagnaðin var tilsamans 1278, 764 børn og 514 vaksin.



# SAVNSFAGNAÐUR 2018

2018 var eitt ár, ið ST ikki setti nakað evni á. Hinvegin var stórur dentur lagdur á heimsmálini. Tað var tí upplagt at lata Heimsmál standa sum yvirskrift og evni fyri Savnsfagnaðin 2018



*Úr leikinum "Huldufólk"*

**Tiltakið var sum vant** í heystfrítíðini 15. - 19. oktobur kl. 11 - 16 hvønn dag. Á skránni vóru uppgávur, sjónleikur og frásagnir. Hvør dagur endaði við einum lutakasti, har vinnarin vann eina familjuferð í Tindhólm, sum Jarðfeingi skipaði fyri. Somuleiðis var ein kapping at finna navn til okkara nýggja maskot: Ein huldugenta, sum Solveig Hansen hevði teknað. Vinnandi navnið gjørdist "Heiða". Klokkan 11.15 hvønn dag las Hjálmar Dam huldusøgu, har hann greiddi børnunum frá, hvussu huldugentan var komin á savnið. Uppgávur til tey vitjandi vóru eins og undanfarna ár skipaðar í einum hefti, ið varð prentað til tiltakið. Nakrar vóru tengdar at framsýningunum og skuldu loysast á staðnum, meðan hinar ikki vóru tengdar beinleiðis at framsýningunum.



## DAGSINS FRÁSØGN

Hvønn dag vóru frásagnir, har starvsfólk frá Tjóðsavninum ella Jarðfeingi tosaðu um eitt ávíst evni, ið hevði nakað við heimsmálini at gera.



*Leikarar úr leikinum "Huldufólk"*

### Dagsins frásøgn 2018

**Mánadag:** Lundaeggið, sum ikki brotnaði – Lis Mortensen
**Týsdag:** Ferðing hjá grind – Bjarni Mikkelsen
**Mikudag:** Nýggj burðardygg fornfrøði, dronir, georadarar 3D og VR – Helgi Michelsen
**Hósdag:** Hvar fer kjógvin? – Janus Hansen
**Fríggjadag:** Søgan er skitin og slitin – Erland V. Joensen



Áðrenn lutakastið, sum lá seinast á degnum, var sjónleikurin "Huldufólk" framførdur hvønn dag av børnum í sjónleikaraskúlanum hjá Sóleyð Danielasen. Sóleyð hevði sjálv skrivað handritið við íblástri frá bátaframsýningini hjá savninum.

Vitjanartalið fyri savnsfagnaðin var tilsamans 1602, 955 børn og 647 vaksin.

*Granskarar og forvitin børn*



*Huldufólk*



*Niðri á Bakka á Velbastað*

# FORNFRØÐILIGAR GRANSKINGARRANNSÓKNIR

Seinastu árini hevur Tjóðsavnið granskað í nýggjum tøkniligum fornfrøðiligum arbeiðshættum. Hetta verður gjørt fyri at fornfrøðiliga skrásetingararbeiðið kann gerast skjótari og neyvari

# FORNFRØÐILIGAR GRANSKINGARRANNSÓKNIR 2017-2018

**Fornar kirkjur**, bønhús og kirkjugarðar eru nýtt sum granskingarevni. Mentanarlandsløg og toftir eru skrásett úr luftini í 3D við dronu. Fornfrøðideildin hevur eisini samstarvað við Sp/f Munin um at nýta georadara ella GPR (Ground Penetrating Radar) á skrásettu lendunum.

Georardaramyndirnar eru síðani eftirkannaðar við fornfrøðiligum rannsóknarveitum á útvaldum støðum, og ein samanbering millum georadaramyndirnar og tær veruligu framgrivnu flatunar er gjørd. Endamálið er at læra at tulka georadaramyndir fornfrøðiliga.

Samfelagsligi ágóðin av verkætlanini er at fáa fornfrøðiligu rannsóknirnar meiri málrættaðar, bíligari og minni tíðarkrevjandi, og harvið at skapa fortreytir fyri einum smidligari samskifti millum planleggjarar og fornminnismyndugleikar. Umframt at geva søguliga vitan, hava fornfrøðiligir fundstaðir atdráttarmegi og eru við til at seta fokus á lokalsamfeløgini og á Føroyar sum ferðamál.

Í 2017-2018 hava fornfrøðiligir granskingargrevstrar verið á Sandi og á Velbastað.

## GREVSTURIN Á SANDI

Fornfrøðiligu viðurskiftini á Sandi eru heilt serstøk. Í 12-1300 árunum vóru natúrligar landslagsbroytingar á Sandi. Broytingarnar førdu so nógvan foksand við sær, at fólkini, ið búðu fram við bakkanum, máttu rýma, og tey búsettust, har bygdin er nú

Upprunaliga búsetingin liggur sostatt fjald og varðveitt undir 1-2 metra tjúkkum sandfláum. Kirkjan er einasta húsið, ið stendur á upprunastaðnum. Eldri fornfrøðiligar kanningar hava víst, at leivdir av 5 eldri kirkjum eru undir kirkjuni, ið nú er. Tann elsta var ein víkingaaldar stavkirkja frá 1000 árunum. At Sandur tá var eitt ríkt samfelag, prógvar silvurmyntskatturin, ið varð funnin við kirkjuna á Sandi í 1863. Tó at fornfrøðingar hava roynt at funnið fram til upprunaligu víkingaaldarhúsini, ið kirkjan hoyrdi til, so hevur tað higartil ikki eydnast.

## STÓRT LANGHÚS MØGULIGA FUNNIÐ Á SANDI

Í august 2017 var fornfrøðilig rannsókn á Sandi. Endamálið við kanningunum var lutvíst grundað á eitt antikvariskt mál, har kirkjuráðið á Sandi ynskti at byggja sóknarhús, og lutvíst granskingarligt at eftirkanna úrslitini av georadarakanningum, ið vórðu gjørdar á staðnum í 2016.

Eftirkanningin og greiningin av georadarakanningunum vístu ein skilligan umleið 33 metrar langan struktur við tí skapi, sum eyðkendu víkingaaldar langhúsini hava. Tað vóru Helgi D. Michelsen og Símun V. Arge frá Tjóðsavninum, ið saman við Fríði Dalsgarð frá Munin greinaðu georadaramyndirnar. Hildið verður, at talan er um eitt víkingaaldar langhús.

Á sumri 2017 fór Helgi D. Michelsen saman við tveimum fornfrøðilesandi, Peturi Hansen og Rannvá Næs Hoydal, undir at gera tvær rannsóknarveitir norðan fyri kirkjuna á Sandi – eina í hvørjum enda á tí strukturi, ið sást á georadaramyndunum frá 2016, og sum sambært greiningunum verður hildið at vera eitt langhús. Í fyrstu veitini komu snotuliga lagdir steinar fram í 1,12 metra dýpd. Hetta verður hildið at vera innara veggjalaðingin í vesturendanum á langhúsinum. Í veit nummar tvey, ið varð løgd í eysturendanum á strukturinum, komu eisini týðiligar veggjaleivdir fram. Harumframt varð komið niður á eina ríka flá inni í húsinum, fylt við matleivdum, so sum djórabeinum, skeljum o.ø. Við at kanna hesar leivdir nærri, kunnu vit fáa til vega vitan um, hvussu og nær fólkini á staðnum livdu.

Fyribils niðurstøðan av hesi rannsókn er, at georadarin kann nýtast í Føroyum til at finna og staðseta fornfrøðiligar leivdir í lendinum. Møguliga víkingaaldar langhúsið, ið her varð avdúkað, er eitt serstakliga áhugavert fund. Fundið er so áhugavert, at tað kann fáa týdning fyri Sandoynna og Føroyar, eitt nú í ferðavinnuhøpi, um tað verður rætt miðlað. Um langhúsið skal gravast út fornfrøðiliga, krevur tað tó, at fígging verður fingin til vega. Tjóðsavnið hevur ikki orku at lyfta eina so stóra uppgávu einsamalt, og má tí finna sær samstarvspartar á útlendskum granskingarstovnum fyri at fáa alla neyðuga fornfrøðiliga serfrøði við í arbeiðið. Tað hevur stóran týdning, at ongin vitan fer fyri skeytið undir útgrevstrinum, tí ein tílíkur útgrevstur gerst bara einaferð. Tí liggur langhúsið best undir mold, til umstøðurnar – bæði tær fíggjarligu og serfrøðin – eru til at grava út. Neyðugt er eisini, at ein ætlan verður løgd fyri, hvussu økið verður rókt og miðlað eftir útgrevsturin.



*Kirkjan á Sandi*



*Leivdir av víkingaaldar langhúsi á Sandi*



*Mannatenn funnar í gomlum grøvum á Velbastað*



*Higartil eru tenn av 5 fólkum skrásettar í gomlu grøvunum á Velbastað*

## UNDRANARVERD STEINSETING UNDAN KAVI Á SANDI Í 2018

Á vári 2018 gjørdi Munin aftur georadarakanningar fyri Tjóðsavnið norðan fyri kirkjuna á Sandi. Hesa ferð við 500 MHz antennu, ið hevur betri upploysn enn 250 MHz antennan, ið varð nýtt í 2016. Á myndunum var tað fyrst og fremst ein stórur umleið 44 metrar langur strukturur, ið sást ganga norður frá gamla kirkjugarðinum og norður í ein boga eystur um langhúsið, ið var áhugaverdur at kanna. Tjóðsavnið hevði sett 5 vikur av til fornfrøðiligu rannsóknirnar. Grevstrartoymið var hesa ferð Helgi D. Michelsen og Símun V. Arge av Tjóðsavninum og Rannvá Næs Hoydal, Andras á Lofti og Petur Hansen, fornfrøðilesandi.

Fyrsta veitin á 4x8 m varð løgd, har ymiskar javnfjarar linjur sóust møta tí langa strukturinum kring langhúsið. Tá komið varð umleið ein metur niður sást, at javnfjaru linjurnar á georadaramyndunum kundu knýtast til velting og eina flagbygda girðing. Undir hesum landslagnum við velting, kom ein vøkur og stór steinseting undan kavi. Steinsetingin er umleið 1,5 m breið og flatan er gjørd av stórum fløtum hellum. Tað sermerkta við hesi steinseting eru kílaformaðu steinarnir, ið standa fram við jaðaranum og líka sum lyfta steinsetingina upp frá. Hetta er fyrsta steinseting av tílíkum slag, ið er funnin í Føroyum, og tí er eitt sindur óvíst, hvat endamál hendan steinseting hevur haft. Møguliga er hetta ein vegur, men hví er steinsetingin lyft upp frá? Kann tað vera fundament undir einum garði kring langhúsið, ella ein stór lokarenna, ið hevur leitt vatn til eitthvørt endamál? Hetta eru spurningar, ið bert kunnu svarast við komandi fornfrøðiligum rannsóknum. Til ber bert at siga, at avbera nógv orka og manntímar hava verið lagdir í at byggja so umfatandi steinseting. Tað kundi tí eisini bent á, at hesin staður hevur havt høgan status ella hóttanir uttanífrá.

Royndir eru tiknar av fláum undir hellunum, og djórabein og snarað baraldarbond eru funnin fram við steinsetingini. Tá ið tilfarið er eftirviðgjørt, kunnu vit siga meira um tíðarskeiðið, tá steinsetingin var í brúki. Serliga baraldarbondini benda tó á, at talan er um víkingatíð. Moldroyndirnar eru nú flotsoldaðar. Tað eru Rannvá Næs Hoydal og Petur Hansen, ið saman við Hákuni Andreassen, savnsteknikara, hava soldað og útvalt tilfar at senda til tíðarfestingar á Århus Univeristeti.

# FORNFRØÐILIGAR GRANSKINGARRANNSÓKNIR 2017-2018

Tíðarfestingar av langhúsinum og steinsetingini verða helst klárar á sumri í 2019. Súsanna Joensen, konservator á Tjóðsavninum, hevur tikið sær av handfaringini av innsavnaða tilfarinum, og Hákun Andreassen hevur tikið sær av skrásetingararbeiðinum.

### ÓKENDAR LAÐINGAR EYSTAN FYRI KIRKJUNA

Ein onnur veit, 2x8 m til støddar, varð í 2018 løgd eystan fyri gamla kirkjugarð, har tað á georadaramyndunum sást nakað, ið kundi mint um gravir og sostatt ein eldri kirkjugarð. Í hesi veit komu fornfrøðiligar leivdir fram næstan beint undir svørðinum og sóust sum garðløg ella veggir, men av tí at veitin var so smøl, bar ikki til at siga, hvørjum endamáli hesar laðingar hava tænt. Her er neyðugt at víðka veitina, fyri at fáa eina greiðari fatan av útbreiðsluni og skapinum á hesum laðingum, soleiðis at endamálið við teimum eisini kann staðfestast og tíðarfestast.

### FYRIBILS NIÐURSTØÐAN AV FORNFRØÐILIGU RANSÓKNUNUM Á SANDI Í 2018

Í mun til fornfrøðiligar tulkingar av georadaramyndum í Føroyum, vóru úrslitini av fornfrøðiligu kanningunum á Sandi í 2018 sera áhugaverd og lærurík. Serliga stóra steinsetingin vakti ans. Uttan georadarakanningar hevði ikki borið til at funnið longdina og bogaða skapið á steinsetingini, og kanningarnar vístu eisini, at georadarin kann nýtast at finna ymisleikar í moldini, so sum velting og flagbygging.

Í 2019 er ætlanin at víðka um veit D eystan fyri kirkjugarðin, og at gera enn eina rannsóknarveit við norðurendan á longu bogaðu steinsetingini. Har síggjast strukturar á georadaramyndunum, ið væntandi kunnu vísa á endamálið við steinsetingin.

### FORNFRØÐILIGU RANNSÓKNARVEITIRNAR Á VELBASTAÐ 2017-18

Forfrøðiliga rannsóknarveitin, sum í 2016 gav okkum gátuføra krossmerkta miðaldarringin, varð í juli 2017 mánaða latin upp aftur og víðkað við 6x5 fermetrum vestureftir

Umframt Helga D. Michelsen, Hákun Andreassen og Súsonnu Joensen frá Tjóðsavninum, vóru 4 fornfrøðilesandi við í grevstrinum. Tey vóru Rannvá Næs Hoydal, Tinna Dianudóttir Hentze (sjálvboðin), Petur Hansen og Daniel Smeds (sjálvboðin), ið lesur fornfrøði á Universitetinum í Umeå í Svøríki.



*'Bisparingurin' av Velbastað varð funnin í 2016*



*Tinna Dianudóttir Hentze, fornfrøðilesandi, bólkar og greinar mannatenn av Velbastað*

Í fornfrøðiliga útgrevstrinum niðri á Bakka á Velbastað, sum var í 2017, vóru mannatenn funnar, og tí kann staðfestast, at talan er um gravir í fornum kirkjugarði.

Búseting hevur verið niðri á Bakka síðan landnámstíðina, men einaferð í miðøld varð flutt longri niðan í lendið, har bygdin liggur nú. Síðan hevur brimið máað tað mesta av elstu búsetingini burtur. Eftir stendur ein vallað kirkju– ella bønhústoft, við kirkjugarði rundanum, og tað var her, ið fornfrøðiliga rannsóknin fór fram.

Inni í kirkjugarðinum komu vit fram á smáar spjaddar steinsetingar, og undir steinsetingunum varð komið niður á gravir. Umhvørvið og saltvatnið hava gjørt, at stórt sæð einki er eftir av beinagrindunum í grøvunum. Men tenn eru meiri mótstøðuførar enn bein, og í 2016 vóru fyrstu tenninar tiknar upp úr moldini, og í 2017 vóru enn fleiri gravir staðfestar. Standurin á tonnunum var sera ringur, og ivasamt var eisini um hetta yvirhøvur vóru mannatenn ella møguliga djóratenn. Myndir av tonnunum vóru sendar til Jakku Heinesen, sála, tannlækna. Hann kundi staðfesta, at hetta veruliga vóru mannatenn. Tástani var vissa fyri, at talan veruliga var um ein kirkjugarð við gravum, soleiðis sum lokalu søgurnar á Velbastað hava sagt, og sum fornfrøðingar fyrr hava tulkað hesar toftir.

Tinna Dianudóttir Hentze var ein av teimum 4 fornfrøðilesandi, ið vóru við í útgrevstrinum á sumri 2017. Hon lesur fornfrøði og osteologi á lærda háskúlanum í Lund, har serligur dentur verður lagdur á beinagrindir. Tað var tí sjálvsagt, at tað var Tinna, ið stóð fyri hegnisliga at grava tær skroypiligu tenninar úr moldini. Síðani hevur hon reinsað, bólkað og greinað tenninar inni á konservatorverkstovuni á Tjóðsavninum.

Higartil eru tenn av 5 fólkum skrásettar. Í teimum førum, har tenninar eru væl varðveittar, ber til at meta um aldurin á teimum deyðu út frá slitinum á tonnunum. Soleiðis kundi Tinna staðfesta, at í einari grøv lá ein persónur, ið var millum 20 og 30 ár, tá hann doyði. Í eini aðrari grøv var tað bara tann eini jaksilin, ið var væl varðveittur. Hesin jaksil vísti seg at vera ein barnatonn. Talan er sostatt um eitt barn millum 2 og 10 ár.

Ætlanin er nú at fáa serfrøðingar at gera neyvari kanningar av tonnunum á verkstovum uttanlands, har til ber at gera C-14 tíðarfestingar, strontium-, kol- og køvievniskanningar av tonnunum. Hesar kanningar kunnu vónandi geva okkum eina tíðarfesting av, nær fólkini doyðu og siga okkum nakað um aldur á teimum deyðu, liviumstøður, hvat tey hava livað av, og um fólkini í grøvunum eru uppvaksin á staðnum ella koma aðrastaðni frá. Enn eru tenninar ikki tíðarfestar, men við eina av grøvunum í kirkjugarðinum var ein hálvur silvurmyntur funnin, ið kann tíðarfestast til fyrst í 900 árunum. Hetta kann vera tekin um, at kristindómurin varð innførdur á hesum staði áðrenn umleið ár 1000, tá Sigmundur sambært Føroyingasøgu kristnaði Føroyar.

Útgrevsturin í juli 2018 á Velbastað vardi, orsakað av øðrum átrokandi arbeiði, bert í 3 vikur. Saman við Helga D. Michelsen og Hákuni Andreassen frá Tjóðsavninum, luttóku Rannvá Næs Hoydal, Petur Hansen og Andras á Lofti, fornfrøðilesandi á útgrevstrinum.

Av tí at standurin á grøvunum er so ringur, bleiv avrátt at steðga við grevstrinum í eystara parti av kirkjugarðinum, og í staðin grava í sjálvari kirkju-/bønhústoftini. Kanningararbeiðið náddi ikki so langt niður, men áhugavert var, at í kulturfláunum beint undir svørðinum vórðu føroysk ílatabrot funnin. Tey finnast oftast í miðaldar- og víkingaldarfláum og bendir hetta á, at kirkjan longu í miðøld er niðurløgd. Tó er at viðmerkja, at J.C. Svabo í 1781 skrivar, at enn var føroyskt leir nýtt til íløt í Leirvík og í Koltri.

Vónandi verður hildið fram við fornfrøðiligu granskingini niðri á Bakka á Velbastað í 2019.

## FORNFRØÐILIGAR KANNINGAR Í SAMBANDI VIÐ ÚTBYGGINGAR

### Sera nógv virksemi var í Føroyum og sera nógv ferð á føroyska búskapinum í 2017 og 2018

**Hetta merktist** á formfrøðideildini, tí hon hevði hesi bæði árini úr at gera við kanningum, grevstrum, uppmátingum og at fylgja við ymiskum arbeiðum í sambandi við mongu útbyggingarnar kring alt landið

Tá útbyggingar verða gjørdar, ella tá tað á ein ella annan hátt verður grivið í jørðini, er uppgáva Tjóðsavnsins at kanna, um fornminni eru í økinum fyri at tryggja tey og at skráseta tey. Seinnu árini er Tjóðsavnið eisini farið undir at 3D skráseta mentanarlandsløg, hóast eingi fornminni eru í økinum. Tjóðsavnið metir, at tað er neyðugt at skjalprógva, hvussu okkara mentanarlandsløg einaferð sóu út. Hesi gerast færri og færri, og er hetta serliga orsakað av útbyggingum, men eisini tí, at ikki er brúk fyri økjunum longur til landbrúks og fella tey tí aftur í forna.

3D uppmátingarnar kunnu síggjast á alnótini. Slóð til uppmátingarnar er á heimasíðu Tjóðsavnsins.

**Í alt gjørdi savnið knappar 20 kanningar. Tær mest umfevnandi vóru:**

- Í Klaksvík í sambandi við gerð av spæliplássi og viðarlund.
- Í Hvalba og Trongisvági í sambandi við nýggjan tunnil millum bygdirnar
- Í Famjin og Øravík í sambandi við tunnil millum bygdirnar
- Í Ergidali omanfyri Hov í sambandi við ætlanir um at gera vatnbyrgingina hægri í sambandi við orkuútbygging
- Á Glyvrum í sambandi við ætlanir at byggja nýggja kirkju
- Í Norðragøtu í sambandi við nýggja kloakk
- Í Dali og Húsavík í sambandi við tunnil millum bygdirnar
- Á Norðoyri í sambandi við gerð av spæliplássi
- Í Kunoy í sambandi við ynski um at byggja kirkjuhús upp í verandi kirkju
- Í Hvalba í sambandi við kaðalarbeiði.
- Á Vatnsoyrum í sambandi við útstykking
- Á Sandi í sambandi við undirsjóvartunnil



*Í 1950-inum varð roynt at fáa Eyðanstovuskipið upp. Mynd Jesar Hansen*

# Gátan um skipið í Eyðunsurð í Sandavági umsíðir loyst

**Tjóðsavnið og Vága kommuna skipaðu hósdagin 8. novembur 2018 fyri almennum og ókeypis fyrilestri á Giljanesi um fornfróðiligu kanningarnar av sonevnda Eyðanstovuskipinum**

**Fyrilestrahaldararnir** vóru Philipp Grassel, Ph.d. í havfornfrøði, sum arbeiðir á Deutsche Schifffahrtsmuseum í Bremerhaven, Kevin Martin, havfornfrøðingur, sum er íri og í løtuni ger eina Ph.d í Íslandi, og Helgi D. Michelsen, leiðari á fornfrøðideildini á Tjóðsavninum.

Havfornfrøðingarnir vóru tá gestir hjá Tjóðsavninum í sambandi við fornfrøðiligu kanningarnar av leivdunum av skipsvrakinum, sum kom til sjóndar í Eyðunsurð í Sandavági í 1947.

Skipsleivdirnar hava ligið á goymslu á Tjóðsavninum øll hesi 71 árini, síðani Sverri Dahl, fyrrverandi landsantikvarur, var í Sandavági og kannaði leivdirnar. Nakað av skipstimbrinum varð tikið upp úr sandinum og fingið á savnið av sandavágsfólki, og nakað liggur enn í sandinum og kemur til sjóndar, tá fjøra er.

Áhugin hevur verið stórur fyri hesum skipsleivdum, og nógvir spurningar og gitingar hava verið um, hvussu gamalt skipið mundi vera og hvaðani tað kom, tí gomul søgn var í Sandavági um strandaða skipið í Eyðunsurð, langt áðrenn hetta skipið varð funnið í 1947.

Nú serfrøðingarnir í havfornfrøði vóru á Tjóðsavninum og kannaðu leivdirnar av skipinum, bar til at koma nærri einum svari, hvaðani skipið kom, og nær tað varð bygt.

Ein partur av kanningunum var at saga flísar av útvaldum skipslutum og senda tær til kanningar av viðingini, ella dendrokronologiskar kanningar. Hesar kanningar vóru gjørdar av Aoife Daly, Ph.d, á Dendro.dk í Keypmannahavn.

Í niðurstøðuni stendur m.a., at timbrið, ið skipið varð bygt av, vaks í skógunum norðarlaga í týska landspartinum Niedersachsen. Timbrið er felt í árunum millum 1632 og 1638 e.Kr., síðan er tað helst ført oman eftir Elbeánni til eina skipasmiðju í økinum við áarmunnan, har skipið varð bygt.

Sostatt er talan um eitt skip úr 1600 talinum og ikki úr víkingatíð, sum onkur fyrr hevur hildið.

Nú er eftir at kanna tær skrivligu heimildirnar, ið møguliga kunnu siga meiri um hetta skipið. T.d. skrivar J.C. Svabo, í Indberetninger fra en rejse i Færøe í 1781-82, at fyri umleið 150 árum síðani kom svarta rottan av fyrstan tíð til Vágoynna við einum skipi, ið strandaði í Sandavági.



# SKRÁSETING AV KRÍGSMINNUM




*Krígsminni skrásett í Vágum higartil*

Leivdirnar frá seinna heimsbardaga eru so líðandi horvnar, so hvørt sum samfelagsútbyggingin hevur tikið dik á seg. Men grundað á tilmæli frá fornminnisnevndini staðfesti landsstýriskvinnan í mentamálum tann 1. mai 2009, at krígsminni frá seinna heimsbardaga eru friðað jarðfest fornminni

**Við hesari staðfesting** fekk Tjóðsavnið, ið varðar av fornminnum, eisini ábyrgdina av at skráseta og kortleggja øll krígsminni í Føroyum, fyri at tey soleiðis kunnu verða varðveitt og miðlað bæði nú og framyvir. Hetta er ein stór uppgáva, men í 2017 og 2018 kom rættuligt glið á skrásetingararbeiðið.

Í samstarvi við Søgu- og Samfelagsdeildina á Fróðskaparsetrinum, kom Jon S. Hansen, søgulesandi, í starvsroynd á Tjóðsavninum. Jon fekk upplæring í at skráseta krígsminni og staðseta tey við GPS og at leggja staðsettu krígsminnini inn í talgildu kortskipanina (GIS) á Tjóðsavninum. Síðani skrásetti Jon S. Hansen øll krígsminni í Vága kommunu. Hetta arbeiðið var stuðlað av Vága kommunu. Jon fekk eisini søguligt tilfar til vega frá lokalum heimildarfólki og úr skjalagoymslum, sum síðan vórðu knýtt at staðsettu krígsminnunum í GIS-dátugrunni á Tjóðsavninum.

Skrásetingararbeiðið hjá Jon endaði við eini BA høvuðsuppgávu í søgu á Fróðskaparsetrinum og einum fyrilestri saman við Helga D. Michelsen frá Tjóðsavninum á Savnsfagnaðinum í Vágum 20. - 22. apríl í 2018. Í 2018 helt Tjóðsavnið saman við Jon S. Hansen fram at skráseta krígsminni, nú í øllum Føroyum. Hendan týðandi krígsminnisskráseting verður liður í Master høvuðsritgerðini í søgu hjá Jon S. Hansen.

# VARÐVEITSLU-ARBEIÐINI Í KIRKJUBØ



Veðurverjan, sum hevur ligið á Múrinum síðan 2004, er nú burtur

Seinastu tvey árini eru varðveitsluarbeiðini á miðaldar biskupssetrinum í Kirkjubø farin fram á fleiri mótum

## MÚRURIN

Rættiliga umfatandi fyrireikingararbeiði skal gerast, áðrenn farast kann undir veruligu varðveitsluarbeiðini. Ymiskt tilfar skal fáast til arbeiðsplássið við Múrin – stóru arbeiðspallarnir skulu setast upp, fyribilsveðurverjan skal takast niður, og arbeiðsplássið á pallunum skal dekkast við plasti, ið gevur lívd fyri regni og vindi, og sum ger, at arbeiðast kann í mest sum øllum veðri.

Eins og árini frammanundan varð í 2017 lagt til brots í mars, tá fyrireikingarnar vóru gjørdar í sambandi við varðveitsluarbeiðini, ið fremjast skuldu upp á mætasta fornminni okkara, Múrin.

Talan er um arbeiði, ið farið varð undir í 2012, og sum er farið fram í tíðarskeiðinum mars-septembur á hvørjum ári. Arbeiðið er liður í tilmælinum um varðveitsluarbeiðini í Kirkjubø, landsstýriskvinnan við mentamálum fekk handað í 2008, og sum hon staðfesti í januar 2009. Tilmælið er ein heildarætlan, ið fevnir um øll fornminnini á miðaldar biskupssætinum í Kirkjubø.



# VARÐVEITSLUARBEIÐINI Í KIRKJUBØ 2017 OG 2018



*Fundur í Roykstovuni í Kirkjubø í 2018*





*Framsýningin í bíðirúminum í Kirkjubø*



*Toftirnar av Líkhúsi verða tryggjaðar*

Eftir at hava gjørt fakligar og tøkniligar fyrireikingar, varð arbeitt fram til endan av august í 2017. Arbeiðið gekk sambært ætlan, og var komið um útsynningshornið og nakað inn á eysturendan av Múrinum. Arbeitt hevur øll árini verið eftir einum og sama leisti, har fyrst bygningsfornfrøðiligar skrásetingar hava verið gjørdar, áðrenn múrararnir eru sloppnir fram at múrverkinum at gera varðveitsluarbeiðini. Harnæst er so framda múrarbeiðið skrásett, soleiðis at eitt neyvt yvirlit er yvir, hvørji tiltøk og inntriv eru gjørd í múrverkið. Hetta er gjørt sambært altjóða siðvenju, m.a. so eftirtíðin kann taka neyðug atlit, tá og um hetta gerst neyðugt.

Í 2018 varð farið undir arbeiðini um miðjan apríl. Arbeiðið hetta árið fevndi um at varðveita eysturmúrin bæði innan og uttan, eins og innsíðuna av eystara partinum av norðurmúrinum, t.e. múrurin, ið vendir móti kapellinum – tilbygninginum eystast á norðursíðuni. Serligu avbjóðingarnar hetta árið vóru eitt nú í stóra vindeygaopinum eystureftur, har partur av múrverkinum og profilsteinar eru gliðnir út, og eru um at detta burtur úr laðingini.

Mannagongdin hevur verið, at hvørt ár, tá arbeiðsumfarið er lokið einaferð í august, eru veðurverja og arbeiðspallar tikin niður, har varðveitsluarbeiðini eru liðug. Síðan er so tann parturin av múrinum komin at standa berur aftur – múrverkið er væl og virðiliga varðveitt, og múrkrúnan løgd við flagi. Í 2020 er ætlanin, at allur Múrurin skal standa berur aftur!



*Birgir Krossteig, múrari, og Hans Christian Frederiksen, konservator, tingast um loysnir*

## LÍKHÚS

Eftir at kirkjutoftin varð skrásett við dronu í 2015 varð í 2016 veðurverja sett upp í landnyrðingspartinum av múrinum á kirkjutoftini. Eins og gjørt var við Múrin longu í 2004 er endamálið at verja múrverkið móti niðurbrótandi kreftunum – veðri og vindi. Samstundis sum veðurverjan verjir múrverkið, er hon so opin, at múrverkið verður turkað upp av tí gjóstri, ið er undir verjuni – eitt tiltak, sum við mátingum vísti, at hetta eydnaðist við Múrinum. Verjan er ætlað at standa uppi í avmarkað tíðarskeið.

Í 2017 varð farið undir sjálvt varðveitsluarbeiðið av vestara partinum. Avgjørt varð longu 2015, at arbeiðsháttur in her skuldi vera hin sami, sum nýttur hevur verið upp á Múrin – tvs. at múrverkið skal reinsast og varðveitast. Alt arbeiðið upp á Líkhús varð í 2017 gjørt í mai mánað, og lagt varð upp fyri, at tað skuldi halda áfram næsta summarið.

Í 2018 varð so hildið áfram at varðveita vestara partin av norðurmúrinum og tað, sum stendur eftir av vesturmúrinum – tað er tað, sum stingur seg nakað upp úr lendinum, og sum er mest sjónligt har á staðnum. Í fjør varð helmingurin av hesum bygningaparti konserveraður, eitt nú við at festa okkurt av niðurdotna grótinum. Arbeiðið á Líkhúsið vardi frá 23. apríl fram til 17. mai, tá konservatorurin fór av landinum aftur.

## MÚRURIN OG JARÐFRØÐIN

Í 1952 vóru umfatandi felags føroyskar-danskar-norskar fornfrøðiligar rannsóknir settar í verk – eitt arbeiði, ið vardi fram til 1955. Longu tá var jarðfrøðingurin, Jóannes Rasmussen, táverandi stjóri á Náttúrugripasavninum, við í Kirkjubø, har hann kannaði gróttilfarið, ið nýtt var til byggingina av Múrinum.

Kanningar, har mett verður um, hvussu ymiskt slag av gróttilfari hevur verið gagnnýtt, hava víst seg at vera sera viðkomandi í sambandi við kirkjurannsóknir eitt nú í Noregi. Tí varð ynskiligt at fáa í lag samstarv við jarðfrøðing við førleika at viðgera slíkar spurningar.

Hetta var ætlanin, tá skipað var fyri sonevnda Grundifundinum, ið varð hildin í Roykstovuni í Kirkjubø í september 2011. Tá lá ikki fyri at fáa slíka avtalu í lag, men í 2017 varð borið so í bandi, at Per Storemyr, ið arbeiðir lutvíst á Kvernsteinsenteret í Hyllestad í Vesturnoregi og lutvíst sjálvstøðugt, vitjaði í Kirkjubø í juli, har hann fekk høvi til at kanna múrverkið neyvari. Heitt var á Una Árting, jarðfrøðing á Jarðfeingi, um at vera við í nevndu kanningum saman við Storemyr.

Endamálið við kanningunum er eitt nú at staðfesta, hvørji sløg av basalti eru nýtt til byggingina av Múrinum. Tað er skilligt, at alt eftir hvar í bygninginum grótið er vorðið nýtt, er tilfarið serliga útvalt til endamálið. Til dømis sæst, at bleytari basalt er nýtt til at høgga serligar prýðispartar í múrverkinum eins og kring op – til vindeygu og dyr. Til slík endamál er tað bleyta basaltið betur egnað enn t.d. tað, ið er nýtt sum laðingargrót í múrverkinum. Hinvegin hevur hetta so havt við sær, at tíðarinnar tonn sæst nógv skilligari á hesum pørtum enn á múrunum.

Annar spurningur er so, hvar ymisku basaltsløgini finnast í lendinum – er hetta í Kirkjubø, tætt við, ella skuldu menn leita longri burtur eftir ávísum sløgum, ið so skuldu flytast til Kirkjubøar? Hvørjar leiðir eru brúktar, og



*Bispamynd í Múrinum*

hvussu er hetta gjørt, um so er? Spurningarnir eru nógvir, og hava hesir mentanarsøguligu spurningarnir sum so ikki verið tiknir við í arbeiðið áður.

## MIÐLAN AV FORNMINNUNUM

Annar og tíðandi liður í varðveitsluarbeiðunum er at kunna almenningin um tey arbeiðini, ið fara fram. Eisini er umráðandi at kunna um tey fornminni, ið finnast á staðnum, og sum tey vitjandi eru komin at síggja og kunna seg um.

Hóast ymiskt hevur verið gjørt frá Tjóðsavnsins síðu, er nú farið undir at leggja størri dent á kunningina og at menna hana.

Við støði í Viðskiftahúsinum, Tórshavnar kommuna bygdi fyri nøkrum árum síðani í Kirkjubø í sambandi við bussleiðina, tóku Tjóðsavn Føroya og Tórshavnar kommuna á heysti 2017 upp samstarv um kunningartiltak, ið byrjar inni í húsinum. Har er stórur veggur prýddur við myndevnum, tengd eru at fornminnunum í bygdini, men ikki við teksti. Tí har ber nú til hjá fólki at fáa sær ein faldara, har tað á fýra málum í stuttum verður greitt frá fornminnunum í bygdini. Harumframt varð ein bóklingur útgivin í desembur 2018, har fornminnini verða neyvari lýst – ein dagføring av tí grøna heftinum, ið kom út í 1989. Eins og faldararnir, er bóklingurin prentaður á fýra málum – føroyskum, donskum, enskum og týskum.

Harumframt skipaði Tjóðsavnið fyri sonevndum Grundifundi, ið hildin varð í Roykstovuni í Kirkjubø í oktobur 2018. Hetta var so at siga framhald av líknandi fundi í 2011, har granskarar innan fornfrøði, lista- og byggifrøði úr Noregi, Danmark, Onglandi, Skotlandi og Føroyum vórðu bodnir til Kirkjubøar at umrøða evnið við atliti at mentaminnunum á miðaldar biskupssetri Føroya. Endamálið við fundinum var at fáa fram nýhugsan um ymisku mentaminnini har á staðnum, eins og ætlanin er, at framløgurnar og forvitnisligu úrslitini skulu gevast út á prenti innan ikki alt ov langa tíð.

## ARBEIÐIÐ

Dagliga konserveringsarbeiðið upp á Múrin ger Múraravirkið Sp/f Krossteig við Birgiri Krossteig úr Havn. Jónhild Johannessen, arkitektur, ger bygningsfornfrøðiligu skrásetingina, eins og hon hevur sniðgivið kunningartiltakið í samstarvi við fyritøkuna Sendistovan. Símun V. Arge, ráðgevi og granskari á Tjóðsavni Føroya, er verkætlanarleiðari fyri nevndu arbeiði í Kirkjubø, og hevur hann skrivað tekstirnar til faldarar og bókling.








# VERKÆTLANIN AT VARÐVEITA HVALASTØÐINA VIÐ ÁIR

Síðan á vári 2011 hevur verið arbeitt við at varðveita hvalastøðina við Áir. Talan er um at varðveita hetta serstaka ídnaðarminni frá 1905 og kortleggja hendan vinnutátt sum natúrligan part av maritimu søguni í nýggjari tíð



*Smiðjan aftur komin til heiður og æru. Niels Nielsen og Hans Højgaard hampa um*



*Fráfarni savnslærarin Regin Debess á Hvalastøðini við Áir 15. august 2018*



*Desembur 2018. Tað verður gongt aftur á Planinum*

**Verkætlanin helt fram** eftir sama leisti sum undanfarin ár. Tað stóra takið var at fáa lagt timbur aftur á flensiplanin – *Planin*, og somuleiðis at føra smiðjubygningin aftur sunnanvert á støðini, har eldsmiðja er, og har ið mekaniskur verkstaður og tunnuvirki var. Brúgvin um Ánna við Áir varð styrkt og stoypt varð uppundir aftur. *Ketilshúsið* er aftur tætt, men enn vantar ein størri umvæling innan. Hús vórðu málað – tekjurnar eru grønar, klæðningurin er reyður og vindeygu eru kittað av nýggjum. Hurðar eru eisini gjørdar.

Eitt størri ruddingararbeiði fór fram á Planinum og inni í flestu húsum. Tað mest ítøkiliga, sum sæst, er tó Planurin og smiðjubygningurin. Samanumtikið standa øll hús á hvalastøðini á tryggari grund aftur. Verkætlanin at varðveita hvalastøðina hevur ikki játtan til viðlíkahald og bráðfeingis ábøtur. Arbeitt verður enn eftir einum áliti, Ávegis áliti um varðveiting av hvalastøðini sum sjóvinnusavn (Mentamálaráðið 2007), og framvegis ikki eftir álitinum *Hvalastøðin við Áir. Álit um økisskipan* (Mentamálaráðið 2013).



*Martin Næs, Tony Asumaa, Herleif Hammer og Viveka Löndahl á Hvalastøðini*

Timburmeistararnir Jón Láadal, Ingi W. á Tórgarði og Martin Mørk hava staðið fyri at umvæla húsini, og Mayfinn Norðoy frá arkitektastovuni Kontrast hevur byggileiðsluna um hendur.

Verkætlanin at varðveita hvalastøðina, árini 2011 til ársenda 2018, hevur kostað kr. 13,3 mió.

## MIÐLAN AV HVALASTØÐINI VIÐ ÁIR

Støðin við Áir umboðar eina týðandi ídnaðar- og maritima søgu í 20. øld. Áhugin er vaksandi, og miðlan av støðini við Áir verður javnan gjørd. Talan er bæði um vanligar fyrispurningar frá fólki, og eisini uttan úr heimi.

24. august 2017. Eftir áheitan úr Uttanríkis- og vinnumálaráðnum, og í sambandi við almenna vitjan úr japanska hvalveiðibýnum Taiji, var borgarstjórin Kazutaka Sangen saman við fylgi, einum ráðgeva í japanska fiskimálaráðnum og einum fyrrverandi stjóra á japanska hvalagranskingarstovinum, á vitjan, og vórðu tey víst runt á hvalastøðini.

1. desembur 2017. Arkitekturin Albert Isfeldt og onnur fakfólk, sum hava áhuga í mentanararvi og ídnaðarsøgu, vóru á vitjan.

26. januar 2018 var Løgtingsins Mentanarnevnd á vitjan. Tjóðsavnið vísti runt á støðini, og greiddi frá um søguna hjá støðini, um verkætlanina og um savnsætlanina í framtíðini. Sunda Kommuna tók lut og bjóðaði miðmála.

2. mai 2018 høvdu norðurlendsk arkitektafakfeløg fund í Føroyum, og eftir áheitan frá Ole Jensen, arkitekti, varð víst runt á støðini.

23. mai 2018 varð víst runt á støðini fyri norðurlendskum UNESCO-nevndum, sum høvdu fund í Føroyum. Sunda kommuna tók lut, og borgarstjórin Heðin Zachariasen hevði framløgu um hvalastøðina og ferðavinnu í kommununi.

16. juni 2018 varð víst runt fyri sjálvboðnum í Reyða Krossi.

11. juli 2018 varð vitjan av norska savninum Kystmuseet i Øygaarden, Museum Vest. Savnsleiðarin Bjørg Christophersen og fotografurin Jan Robert Jore stóðu fyri upptøkum og samrøðum til dokumentatión av hvalastøðini. Dagin eftir var fundur um samstarv millum søvnini.

4. septembur 2018 vóru Tony Asumaa, álendskur ráðharri fyri mentan, ítrótti, kunningartøkni og útbúgving, og Viveka Löndahl, landsantikvarur, á vitjan á hvalastøðini.

19. septembur 2018 um kvøldið tók Tjóðsavnið lut í árliga tiltakinum hjá Sunda Kommunu, Mentanardagar 2018. Kommunan skipaði fyri hugnaløtu, og savnsvørðurin Erland V. Joensen hevði framløgu. Hvalastøðin var opin, og eini 250 fólk løgdu leiðina til Áir.

9. oktobur 2018 vóru arkitektastudentar og undirvísarar frá Arkitektskolen í Aarhus og vitjaðu hvalastøðina fyri at máta hvalastøðina upp, og hesi fingu eina drúgva rundvísing.

Norski journalisturin Liv-Karin Edvarden var á hvalastøðini hálvan septembur 2018 og skrivaði grein í Kyst og Fjord: *Norsk hvalhistorie reddes på Færøyene*, okt. 2018, uke 40, nr 39, 8. árg.

10. novembur 2017 var Hvalastøðin við Áir í KvF-sendingini *Við Tórði á túri*.

13. septembur 2018 var Hvalastøðin við Áir í KvF-sendingini *Nón*.



Max Cecil Weihe var við sum heimildarmaður

# NORDAFAR OG FØROYINGAHAVNIN

**Á fundi í Føroyum tann 18. mars 2016 bar grønlendski landsstýrisformaðurin Kim Kielsen fram eitt ynski um, at Føroyar áttu at ruddað upp í Føroyingahavnini og á Nordafarstøðini**



Grønlendski savnvørðurin Mikkel Myrup

**Tann 20. apríl 2016** setti Løgmansskrivstovan ein stýrisbólk at standa fyri at fyrireika eina forkanning. Í honum sótu Andras Mortensen, stjóri á Søvnum Landsins sum formaður, Ewald Kjølbro, stjóri á Landsverki og Sjúrður Rasmussen, løgfrøðiligur ráðgevi á Løgmansskrivsstovuni.

Av tí at gomlu støðirnar forfarast, varð hildið neyðugt at fáa greiðu á, hvussu farast skuldi fram fyri at minka um umhvørvisampan av hesum støðum.

Í sambandi við ein ríkisfund í Grønlandi var spurningurin um upprudding eisini tikin upp. Kim Kielsen, landsstýrismaður, og Aksel V. Johannesen, løgmaður, vóru á vitjan á Nordafar tann 28. apríl 2016. Samstundis varð avtalan millum Føroya Landsstýri og Naalakkersuisut um menning og sínámillum samstarv undirskrivað.

Endamálið við forkanningini var í høvuðsheitum at fáa greiðu á søguligu viðurskifti, at myndaskráseta Føroyingahavnina og Nordafarstøðina, at fáa eitt yvirlit yvir bygningsteknisku støðuna, ognarviðurskifti og ábyrgdina av ognunum, møguligar vandar, ið standast av bygningunum, spurningar í sambandi við mentanararv, og at fáa eina kostnaðarmeting av møguligari burturbeining, partvísa varðveiting ella varðveiting.

## SKRÁSETA OG SKJALFESTA STØÐIRNAR

Tann 26. mai 2017 fór ferðalið úr Føroyum til Grønlands. Endamálið var at máta upp hús og bygningar, sum enn standa uppi, og at skráseta og skjalfesta hesar støðir. Forkanningin var neyðug fyri at taka støðu til, hvat ið veruliga skuldi henda við Føroyingahavnini og Nordafar.

Fyri at fáa eina heildarfatan av ídnaðar-, sosial- og mentanarsøguni var eisini Max Cecil Weihe, fyrrverandi stjóri á Nordafar, við sum staðkendur heimildarmaður. Luttakararnir vóru byggifrøðingurin Helgi Johannesen og arkitekturin Bárður Dam í Baianstovu, báðir frá Landsverki, og Erland Viberg Joensen, savnvørður á Tjóðsavninum. Forkanningin fór fram í tøttum samstarvi við savnvørðin Mikkel Myrup á grønlendska tjóðsavninum, Nunatta Katersugaasivia Allagaateqarfialu, sum stóð fyri at 3D-avmynda og myndaskráseta støðirnar og økið nærhendis. Savnvørðurin Hans Harmsen var við ein part av tíðini.

Føroysku luttakararnir vóru heima aftur tann 17. juni 2017, og øll kanningin var liðug á heysti 2017. Tann endaliga frágreiðingin við tilmælum var liðug í januar 2018. Hon er til landsstýrini í Føroyum og í Grønlandi at brúka til viðgerð og politiska støðutakan og ber heitið: Nordafar – social-, kultur- og industrihistoriske værdier. Forundersøgelse af Nordafar-stationen og Færingehavnen i Grønland. Rapport – anbefaling og stillingtagen til stationens fremtid. (Jan. 2018. Landsverk og Tjóðsavnið).







Nordafar-støðin

## NÆRUM ÓMØGULIGT AT VARÐVEITA

Út frá einari fakligari meting eru Nordafar og føroyska sjúkrahúsið í gomlu Føroyingahavnini í so mikið vánaligum standi, at ein varðveiting er nærum ómøgulig og meiningsleys. Við støði í tí, ið kanningarliðið kom fram til, hevur stýrisbólkurin mælt til, at allir bygningar verða tiknir niður og burturbeindir. Einstakir bygningar á Nordafar eru verdir at varðveita, men umboða einans ein lítlan part av heildini. Mælt verður til at taka niður og burturbeina øll hús og allar bygningar úr timbri og øðrum byggitilfari, soleiðis at gólv og grundir úr betong standa eftir. Á tann hátt vil umhvarvið og heildarmyndin av støðini standa eftir sum eitt ídnaðarminni frá nýggjari tíð.

Av tí at Føroyingahavnin, Nordafar, føroyskur útróður og fiskivinna í Grønlandi enn fyllir nógv, verður mælt til eitt grønlendskt-føroyskt vísindaligt samstarv um felagssøguna hjá hesum londum, sum er í tráð við avtaluna í 1916 millum Føroya Landsstýri og Naalakkersuisut um menning og sínámillum samstarv.

Frágreiðingin varð løgd fram í Tinganesi á landsstýrisfundi tann 15. januar 2018. Í døgunum 12.-16. februar 2018 var kanningarliðið og stýrisbólkurin, nú við Herleifi Hammer, stjóra á Tjóðsavninum, sum formanni í bólkinum, í Grønlandi og løgdu fram frágreiðingina við tilmælum á tjóðsavninum Nunatta Katersugaasivia Allagaateqarfialu, sum er antikvariskur myndugleiki, og somuleiðis í aðalráðnum fyri náttúru og umhvørvi, Pinngortitamut Avatangiisinullu Naalakkersuisoqarfik. Tann 3. mai 2018 var frágreiðingin løgd alment fram á Tjóðsavninum í Brekkutúni. Harafturat var eitt innslag í Kringvarpinum um frágreiðingina seinni sama dag saman við løgmanni.

Spurningurin um ognarviðurskifti, og sostatt eisini um hvør, ið hevur veruligu ábyrgdina av ognunum, serliga Nordafar, er enn ógreiður. Føroysk luttøka og vinnuligt virksemi hjá føroyingum í Grønlandi hevur í stórum ligið



Frágreiðingin alment løgd fram á Tjóðsavninum

á privatum hondum, tó partvíst fíggjað við almennum føroyskum stuðli. Spurningurin er ikki svaraður, og avvarðandi aðalráð í Grønlandi hevur saman við Løgmansskrivsstovuni roynt at greina hesi viðurskifti.

Eftir ætlan skuldi kanningarliðið fara til Grønlands í 2018 at skoða, skráseta og meta um hini plássini, har føroyingar róðu út og høvdu vinnuligt virksemi, á Ravns Stóroy, á leiðum við Toqqusaq, Grátifjørðin, Kangarssuk, Borgshavn og onnur smærri føroysk útróðarpláss í Vesturgrønlandi. Ætlanin var tó av ongum.

# GLORIA SAMSTARVIÐ

## – Veðurlagsbroytingar síggjast á fjallatoppum



Á Sandfelli

**Gróðurin í háfjallinum nærindis fjallatoppum er áhugaverdur í sambandi við veðurlagsbroytingar. Tað er væl kunnugt, at lívverur flyta seg, tá teirra umstøður broytast. Men á fjallatoppum í øllum heiminum hava vit ein gróður, sum ongastaðni hevur at fara. Tann alpini gróðurin verður háfjallagróðurin vanliga nevndur**

**GLORIA**, sum er ein stytting fyri Global Research in Alpine environments, er ein stór langtíðar granskingarætlan, sum hevur luttakarar úr øllum heiminum. Tjóðsavnið hevur luttikið í ætlanini síðani 2010.

Fjøll í øllum limalondum verða kannað 5. hvørt ár, við júst somu mannagongdum. Hetta eru einfaldar kanningar fyri so lætt sum gjørligt at kunna samanbera dátur úr øllum londunum. Fjøllini, sum verða kannað í Føroyum eru Sátan, Sandfelli, Tunglufjall og Lambafelli.

Dáturnar, sum vera savnaðar, eru sjálvandi fyrst og fremst hiti og gróðrardátur. Loggarar liggja og máta hitan á øllum fjøllunum, og 5. hvørt ár vitja plantufrøðingar av plantudeildini á Tjóðsavninum fjøllini fyri at gera umfatandi gróðrarkanningar. Kanningarnar eru ikki blivnar minni viðkomandi, nú granskarar úr øllum heiminum í IPBES-samstarvinum hava staðfest, at ein millión sløg eru við at hvørva úr náttúruni. Hjá okkum í Føroyum er háfjallið serliga viðkomandi, tí at háfjalsgróðurin her, umframt at vera alpinur gróður, eisini er arktiskur.

# SKELTI VIÐ MØLHEYGGJARNAR

**Tað er bara á Sandi, at rættiligir sandheyggjar eru. Teir vera oftast nevndir Mølheyggjar á Sandi og eru friðaðir**



**Mølheyggjar** eru vorðnir til í einum samspæli ímillum sand og plantuvøkstur. Fyritreytin fyri, at sandheyggjar kunnu koma í er, at nóg nógv er til av sandi, og at tey plantusløgini, ið kunnu binda sandin við stórum ógvuliga greinaðum rótum, eisini eru har. Tað eru eyðkennisgrassløgini sandsmarhálmur, *Ammophila arenaria*, breitt sævarkorn, *Leymus arenarius* og sevkendur kveiki, *Elymus farctus*, sum hava røtur, ið kunnu binda sandin fastan í heyggjar.

Sambært løgtingslóg nr 48 frá 9. juli í 1970 gjørdi yvirfriðingarnevndin av í 1983 at lýsa Mølheyggjarnar á Sandi sum friðaðar við kunngerð. Endamálið við friðingini var at varðveita gróður og djóralív í sínum náttúrliga líki. Í Frøði nr. 1 frá 2005 nevnir Anna Maria Fosaa, sála, at tað er at undrast á, at økið við Mølheyggjar er friðað, tá ið eingi skelti ella onnur tekin eru, sum siga fólki, at talan er um eitt friðað øki.

Síðani tá eru tónleikafestivalar hildnir á Mølheyggjunum, motorakfør hava javnan verið at sæð í økinum, og sandur er tikin av Mølheyggjunum til onnur endamál.

Í 2017 gjørdi Tjóðsavnið av, at nú skuldi skelti gerast, sum týðiliga vísti á friðaða økið. Samstundis var høvið eisini nýtt til at kunna um serstaka landslagið, planturnar og dýrini í økinum. Hetta er fyrsti partur í einari størri ætlan um at gera skelti um alt landið við kunning um náttúrufriðað øki, ramsarøki og serstøk øki annars. Umframt Mølheyggjarnar á Sandi, er økið rundanum Leynavatn og Fjallavatn eisini friðað við kunngerð sambært náttúrufriðingarlógini. Skúvoyggin, Mykines og Nólsoy eru ramsarøki. Í bókini *Føroya Náttúra – lívfrøðiligt margfeldi* vóru fleiri smærri øki nevnd, sum eru búøki hjá nógvum djóra- og plantusløgum. Nevnast kunnu Eiðskollur, Gróthúsvatn á Sandi, lyngøkið rundan um Toftavatn og serliga hvíta fjøran við skelsandi á Hvítanesi.







Kjógvi

# KJÓGVAGRANSKING Í FØROYUM

**Í juni 2017 fór Tjóðsavnið í gongd við eina verkætlan, ið snýr seg um at kanna nørings- og stovnsviðurskiftini hjá kjógva í Føroyum. Verkætlanin byrjaði sum samstarv millum lívfrøðingarnar Janus Hansen og Jón Aldará úr Tjóðsavninum, Ines Santos og Dr. Katherine Snell úr Keypmannahavnar Universiteti, og Dr. Sjúrð Hammer. Hetta samstarv hevur sín uppruna í einari kanning frá 2016, ið skuldi lýsa ymisk viðurskifti í sambandi við reiðring og ferðing hjá kjógva í Fugloy**

### STOVNSMETING

Kjógvi er eitt fuglaslag, sum er í stórari afturgongd í bretsku oyggjunum, og støðan kann væntast at vera tann sama í Føroyum. Kjógvastovnurin roknast við at vera sera nær tengdur at øðrum sjófuglastovnum, og tí er tað av stórum týdningi at hava eftirlit við stovnsstøddini og undankomuni hjá hesum fuglaslagi.

Síðani á sumri í 2017 hevur Tjóðsavnið gjørt undankomukanningar av kjógva á útvaldum bølum ymsastaðni í Føroyum. Hesar kanningar skulu lýsa, hvørt føroyski kjógvin er nóg væl fyri til at uppala pisur. Til hesar kanningar hevur Tjóðsavnið í samstarvi við Katherine Snell og Ines Santos ment eina serliga mannagongd fyri Føroyar. Enn eru eingin greið úrslit frá kanningunum, men fyribils sæst, at stórur munur er millum ymisku bølini. T.d. var eingin floygd pisa at síggja í Fugloy í 2018, meðan í Akrabergi taldist í miðal meira enn ein floygd pisa fyri hvørt reiður.

Tjóðsavnið hevur verið við til at ment nýggja mannagongd fyri teljing av kjógva í Føroyum, og eftir ætlan skulu teljingar gerast við í mesta lagi 5 ára millumbilum framyvir. Fyrr hevur bara ein dygdargóð føroysk kjógvateljing verið framd, og hetta var í 1981. Tann teljingini bendi á, at stovnurin tá taldi 1.200-1.500 pør. Í dag tykist hann vera minkaður niður í umleið ein triðing av tí.

### FERÐAMYNSTUR

Tjóðsavnið hevur eisini verið við í tveimum verkætlanum um at spora kjógvar við ferðaloggarum. Onnur er ein kanning av árligu ferðingini millum vetrar- og summarøki. Hetta verður gjørt við sokallaðum ljósloggarum, ið verða festir á ein plastikkring, sum síðani kann setast á beinið hjá kjógvanum. Hesir loggarar geva eina góða ábending um, hvar í verðini fuglurin er.



*Úrslitini frá ferðakanningum eru enn ikki útgivin, og tí ber ikki til at vísa kort við ferðamynstrum hjá kjógva*




*Fyrstu árini var endoskop nýtt til at kanna, um lundapisa var í holunum*

# RAMSARVERKÆTLANIN

**Síðan 2011 hevur Tjóðsavnið arbeitt við at fáa yvirlit yvir drunnhvíta-stovnin í Nólsoy og lundastovnin í Mykinesi, umframt at fylgja við í, hvat er komið undan hjá lundanum í Mykinesi**

Hetta er partur av virksemi í sambandi við Ramsarsáttmálan, sum Innlendis-málaráðið umsitir. Komið er eftir, at vestanfyri bygdina, t.e. í Dalinum, Lamba og Hólminum, eru umleið 60.000 lundaholur. Øll árini eru so nakrar av hesum holum kannaðar. Skrásett verður, um ein hola er brúkt og um pisa er í henni.



*Drunnhvíti verður taldur í Nólsoy*

Í 2018 høvdu lívfrøðilesandi á Setrinum eitt feltskeið. Tá var farið við teimum til Nólsoyar, har tey fingu høvið til at telja drunnhvítar og at leggja reiðurkassar í lendið, sum vónandi kemur at gera teljingarnar neyvari framyvir.



*Lundaholur vera taldar í Dalinum*



*Lundi í Lamba*

Øll árini hevur lundi verið í megin-partinum av holunum, men onkur ár hevur ongin pisa verið at sæð í teimum kannaðu holunum. Árini 2017 og 2018 vóru tey higartil bestu við ávíkavist 36 og 22 pisum fyri hvørjar 100 holur. Fyrireikingar eru gjørdar fyri at kunna kortleggja útbreiðsluna og telja títtleikan av holum við dronu.

Í Nólsoy er drunnhvítastovnurin partvíst taldur og kortlagdur. Komið er eftir, at umleið 20.000 holur eru í økjunum, sum eru tald higartil, tó fevna hesi kanska um helvtina av stovninum.



*Í hesum økinum í Nólsoy er nógvur drunnhvíti*



LANDDJÓRADEILD



*Drunnhvíti*

# RINGMERKING



*Helgolandsrúsan, sum hon sá út í 2010*

**Nógv hevur verið ringmerkt í Føroyum undanfarnu tvey árini. Serliga nógv er komið burturúr hjá fuglafrøðingunum Carsten Schultz og Jens-Kjeld Jensen, sum í fleiri ár hava ringmerkt drunnhvíta í Nólsoy**

Í 2017 og 2018 vóru tilsamans knappir 7.000 drunnhvítar ringmerktir, og væl yvir 300 av teimum, sum fyrr vóru ringmerktir, vórðu fangaðir aftur og skrásettir. Nógvir av hesum vóru ringmerktir uttanlands, serliga í bretsku oyggjunum, men eisini í londum sum Norra og Portugal. Hetta bendir á eina ávísa tilflyting av drunnhvíta til Føroya.

Afturat drunnhvítanum, eru serliga nógv av sjáldum drunnhvíta, lunda, skrápi, kjógva, skúgvi og ravni, ringmerkt í hesum tíðarskeiði, bæði í sambandi við privatar verkætlanir og við almennar verkætlanir hjá Tjóðsavninum og Havstovuni. Nógv spennandi er avdúkað um ferðamynstrini hjá hesum fuglasløgum seinastu árini, og tey verða framhaldandi kannað og ringmerkt í 2019.

## ÁHUGAVERDAR RINGFRÁBOÐANIR

Fleiri áhugaverdar ringfráboðanir eru komnar í 2017-2018. Fleiri fuglar við longum lívi eru funnir, m.a. tríggir skúgvar, ávikavist 12, 13 og 14 ára gamlir, eitt minst 14½ ára gamalt tjaldur, ein knapt 16 ára gamal lundi og ein heili 33 ára gomul súla. Av smáfugli kann nevnast ein bretskt ringmerkt kvørkveggja í Porkeri, bretskt ringmerktur munkur í Grøv í Klaksvík, og ein stari, sum setti met fyri sítt slag í Føroyum. Stari ferðast vanliga ikki víða um, men hesin varð ringmerktur í Nólsoy og varð funnin deyður í Mikladali. Hetta eru 38 km burturfrá ringmerkingarstaðnum, og er hetta longsta innanlandsferðing hjá føroyskum stara, sum mann veit um.

## HELGOLANDSRÚSAN

Helgolandsrúsan, sum er vorðin nýtt til at ringmerkja ferðandi smáfugl í Nólsoy síðani 1994, varð avmonterað 5. juli í 2017 orsakað av, at orka ikki var til at taka sær av henni longur. Grundbygningurin stendur tó enn, og møguleiki er tí fyri at seta felluna upp aftur. Tó stendur hon á privatum øki, og støða má takast í 2020, um grundbygningurin eisini skal takast burtur.



*Serstakliga nógvur drunnhvíti verður ringmerktur í Føroyum*

# BIOFAR-TILFAR HEIMAFTUR



Á fundi í Keypmannahavn tann 1. mai 2018 var avtala gjørd við Zoologisk Museum í Keypmannahavn um at fáa Biofar-tilfar, sum er á savni hjá teimum, aftur til Føroya



*Kúrberg og gamla royndarstøðin har umsiting Tjóðsavnsins er í dag*

**Í tíðarskeiðinum** frá 1988 - 1991 vóru um 800 botnsýni tikin í føroyskum sjóøki til at kanna botndýralívið á dýpum, sum vóru djypri enn 100 metrar. Mett var, at tørvur var á at fáa meiri vitan um hetta økið, tí frammanundan vóru kanningar mest gjørdar inni við land og úti á umleið 100 metra dýpi.

Rúgvumikla tilfarið varð leysliga bólkað umborð á kanningarskipunum og síðan tikið í land og flutt til royndarstovuna á Skriðubakka í Kaldbak, har tað varð neyvari skilt sundur og flokkað. Dýrini frá teimum ymisku djórabólkunum vóru síðani send út í heim til serfrøðingar at navngreina.

Ein stórur partur av tilfarinum varð sendur til Keypmannahavnar, og nú tá ið alt náttúruvísindaliga økið á universitetinum í Keypmannahavn skal skipast av nýggjum og miðsavnast inni við Botaniska havan, er ikki pláss fyri øllum. Tað var í hesum sambandi, at Zoologisk museum ynskti at samráðast um at flyta Biofar tilfarið heimaftur til Føroya.

Fyri at avmarka mongdina av tí, sum skal sendast aftur, er avtala gjørd um at vísindastarvsfólk á Zoologisk museum meta um og taka støðu til vísindavirðið á tilfarinum, og at ein ætlan síðani verður gjørd um, hvussu nógv av tilfarinum skal sendast aftur. Seinni verður so avtalað, hvussu hetta verður sent á besta hátt. Roknast kann við, at fyrsta tilfarið kemur aftur til Føroya í 2020 ella 2021.



*Grønlandstussi, Himantolophus groenlandicus, fingin á gulllaksaveiðu suður úr Føroya Banka á 300 metra dýpi í 2016*




## CAFF – LÍVFRØÐILIGA MARGFELDIÐ Í ARKTISKA ØKINUM

Starvsfólk á Tjóðsavninum hava í mong ár luttikið í arbeiðinum innan CAFF (Conservation of Arctic Flora and Fauna), sum er ein altjóða felagsskapur, ið hoyrir til Nordisk Ministerråd, og sum hevur til endamáls at varðveita eitt framhaldandi fjølbroytt plantu- og djóralív í arktisku økjunum. Tjóðsavnið luttekur innan økini havsúgdjór, plantur og ryggleys botndjór. Seinastu árini er stórt arbeiði lagt í at gera eina støðulýsing av arktisku høvunum, og seint í 2018 kom fyrsta frágreiðingin: "SAMBR – State of the Arctic Marine Biodiversity Report". Frágreiðingin kann takast niður av CAFF-heimasíðuni: *https://www.caff.is/marine/marine-monitoring-publications/state-of-the-arctic-marine-biodiversity-report*

## IPBES

IPBES er eitt vísindapolitiskt samarbeiði millum lond um lívfrøðiligt margfeldi og vistskipanarágóðar, og er ein stytting fyri "Intergovernmental Science-Policy Platform on Biodiversity and Ecosystem Services".

Á heysti 2016 fekk Sjódjóradeildin áheitan um at luttaka í einum átaki kallað "BIODIVERSITY AND ECOSYSTEM SERVICES IN NORDIC COASTAL ECOSYSTEMS". Átakið hevði sum endamál at savna fólk við serligum kunnleika til strandarviðurskifti til at skriva eina frágreiðing til IPBES um lívfrøðiliga markfeldið fram við strondunum í Norðurlondum við dømum úr teimum ymisku luttakandi londunum. Hetta skuldi eisini teingjast saman við samfelagsligum ágóðum, sum økini fáa burtur úr lokalu vistskipanunum.

Fýra arbeiðsfundir vóru, tríggir í Svøríki og ein í Finnlandi. Á fundunum var tosað um, hvussu hetta skuldi gerast, og ein felags leistur varð skipaður. Fyristøðufólk vóru vald til at standa fyri teimum ymisku pørtunum í frágreiðingini. Síðani arbeiddu teir ymisku serfrøðingarnir heimanífrá uppá at skriva eina felags frágreiðing.

Úrslitið er givið út í tveimum frágreiðingum og einari styttari útgávu, sum tekur samanum.

- Biodiversity and ecosystem services in Nordic coastal ecosystems: an IPBES-like assessment
- Vol 1: The general overview
- Vol 2: The geographical case studies
- SUMMARY FOR POLICY MAKERS

Meðan arbeitt var við frágreiðingini sást, at vit í Føroyum eru eftirbátar í mun til hini Norðurlondini, tá ið tað kemur til at skráseta og skipa upplýsingar um lendi, lendisnýtslu og náttúru, og at hetta darvaði arbeiðinum í stóran mun. *Heimasíðan hjá IPBES sæst á www.ipbes.net*

## LTBM SAMARBEIÐIÐ – YVIRLITSTROLINGAR, SUM TÓL TIL AT SÍGGJA BROYTINGAR Í ARKTIS

Tjóðsavnið hevur í nøkur ár luttikið í einari verkætlan, sum nevnist "Long-Term Benthos Monitoring network for detecting changes in the Arctic benthic Ecosystem". Hetta er ein verkætlan, sum hevur sín uppruna í norska/russiska partinum av Barentshavinum, har tey í mong ár hava kannað alt, sum kemur á dekkið í yvirlitstrolingum.

Í staðin fyri bara at skráseta fisk, so fæst munandi meiri vitan um viðurskifti á havbotninum við at skráseta alla veiðuna, t.v.s. bæði fisk og onnur dýr.

Munagóðar eftiransingarskipanir av størri havøkjum eru ógvuliga kostnaðarmiklar, og tí hevur verið mett, at vídfevndar og álítandi kanningar av dýralívinum á havbotninum ikki hava verið realistiskar. Við hesum í huga varð farið undir eina roynd at samskipa hjáveiðuskrásetingar av úrslitum frá øllum yvirlitstrolingum tvørtur um landamørk og yvir tíð í arktisku økjunum. Luttakandi londini hava verið: Noreg, Kanada, USA, Russland, Ísland, Grønland og Føroyar.

Av tí at yvirlitstrolingar verða gjørdar á hvørjum ári, og at kostnaðarmiklasti parturin av at gera eftiransingarkanningarnar er skipstíð, er neyðugt at fáa lívfrøðingar við servitan innan navngreining av botndýrum at skráseta trolhjáveiðuna – tað, sum ikki er fiskur.

Í Føroyum eru vit ikki reiðiliga farin undir at skráseta alt tilfarið frá yvirlitstrolingum fyrr enn í 2017/18, og hava vit tí ikki so nógv at arbeiða við. Tjóðsavnið hevur tó fingið skrásetta tilfarið frá Havstovuni og hevur brúkt hetta í arbeiðinum at samskipa vitan um alt tað arktiska økið.

Arbeiðsfundir hava verið í Keypmannahavn í 2017 og í Reykjavík í 2018. Eftir ætlan verður fundur aftur í Reykjavík ella Nuuk í novembur 2019.

# KOLTUR

## FRÁ FESTI TIL TJÓÐSAVN

Í 2013 tók Føroya løgmaður avgerð um, at Koltur skuldi niðurleggjast sum festi og í staðin gerast til útisavn. Løgmaður gav boð um, at Koltur skuldi flytast frá Fiskimálaráðnum (Búnaðarstovuni) til Mentamálaráðið, og at Mentamálaráðið skuldi gera serstaka antikvariska skipan fyri oynna Koltur, sum frameftir skal rekast sum savn. Mentamálaráðið avgjørdi, at Koltur skuldi gerast ein “integreraður partur av Tjóðsavninum”



*Býlingurin Heima í húsi*



*Teigalendið í Kolti er mentanararvur, sum fer aftur í forna um tað ikki verður brúkt og viðlíkahildið*

## KOLTUR – FRÁ FESTI TIL TJÓÐSAVN

**1. januar 2015** kunngjørdu Søvn Landsins, nú Tjóðsavnið, at ein fyristøðumaður verður settur fyri Koltur, og at arbeitt verður við at gera serliga antikvariska serskipan fyri oynna.

### EINGIN SKRÁ FYRI VITJANDI

Enn er eingin skrá fyri Tjóðsavnið í Koltri. Vitjandi eru vælkomin at vitja bygdalagið og síggja forna býlingin Heimi í Húsi, eins og njóta vøkru náttúruna. Fyristøðumaðurin, saman við Koltursvinum og teirri smávegis hjálp, sum er at taka av, hevur nóg mikið við rakstri, røkt og viðlíkahaldi av húsdjórum, bygdalagnum og oynni sum heild.

Serfrøðingar á Tjóðsavninum, saman við arkitektum arbeiða við eini verkætlan um upprudding, og endurbygging av norðara býlinginum Norðuri í Gerði. Eisini verður arbeitt við at bøta um atkomu, hentleikar og framsýningarhøli.

### EINKI STRANDFERÐSLUSAMBAND ER Í KOLTUR

Strandferðslan gavst við at sigla í Koltur, tá ið fólkatalið minkaði í Koltri. Tá ið tyrlan byrjaði regluliga rutuflúgving í áttatiárunum, fekk Koltur rutusamband loftvegis. Rutusambandið oyggjanna millum er fyrst og fremst tillagað íbúgvunum, og av tí sama er – á ávísum rutum – torført hjá fremmandafólki at brúka almenna ferðasambandið. Soleiðis er støðan á Koltursleiðini. Tað ber ikki til at ferðast við ferðasambandinum aftur og fram sama dag, uttan í serstøkum føri, og tá skal ferðast um flogvøllin í Vágum og aftur. Tó so, tað koma hendinga ferðafólk við tyrluni úr høvuðstaðnum, men tá er oftast talan um ferðafólk, sum tjalda til næsta ferðasamband er, ella tey verða heintað við leigubáti.

Tað kostar einki at vitja Tjóðsavnið í Koltri, tó er atgongugjald á 40 krónur, um farið verður í savnshúsini Uppi í Búð og Heimi í Húsi. Tað er heldur einki eftirlit við, hvør kemur í oynna og hvør fer av oynni. Fyristøðumaðurin hevur av sínum eintingum gjørt eina kanning av, hvussu mong vitjaðu oynna í 2015, 2016 og 2017.

### STRANDFERÐSLAN ARBEIÐIR VIÐ NÝGGJARI KOLTURSLEIÐ

Tá Hestleiðin varð einskild frá Skopunarleiðini var minni og smidligari bátur lagdur á Gomlurætt til at røkja Hestleiðina. Tjóðsavnið í Koltri vísti landsstýrinum á vantandi sambandið og setti fram ynski um at fáa eina Koltursleið á skránna, nú ferja var til taks.

Strandferðslan arbeiðir nú við at fáa eina ferðaætlan millum Gomlurætt og Koltur um summarhálvuna og serstakar túrar, tá ið okkurt serstakt er á skrá, og líkindini loyva tí. Ein slík farleið verður eitt stórt framstig fyri ferðafólk, sum vilja vitja Tjóðsavnið í Koltri.

Sum er leiga ferðafólk sær bát og gera dagstúrar út í Koltur summarhálvuna.

Sum sæst á talvuni, er ikki óvæntað nógv mesta vitjanin um summarhálvuna. Eitt fyribrigdið, sum ávirkar vitjanartølini lutfalsliga nógv, er oyggjadagurin, sum Tórshavnar Kommuna skipar fyri. Talan hevur verið um eitt afturvendandi tiltak, har fólk, umvegis Visit Tórshavn kunnu ogna sær ferðaseðlar fyri ein sámuligan prís til tær tríggjar oyggjarnar í Tórshavnar Kommunu, Nólsoy, Hest og Koltur ein dag um árið.

Oyggjarnar hvør sær skipa síðani fyri ymiskum tiltøkum, gongutúrum v.m.

Sum tað sæst á talvuni var oyggjadagurin 2017 avlýstur orsakað av vánaligum veðurlíkindum.

### MEST FØROYINGAR, SUM VITJA TJÓÐSAVNIÐ Í KOLTRI

Uttan iva er trupla ferðasambandið høvuðsorsøkin til, at so fá fremmandafólk vitja Tjóðsavnið í Koltri. Kanningarnar av 2015, 2016 og 2017 vístu, at í miðal vóru 78 prosent av teimum, ið vitjaðu Koltur hesi trý árini, føroyingar.

### SERSTAKAR VITJANIR

Ymiskt er hvørji áhugamálini eru hjá teimum vitjandi. Eisini er ymiskt, hvørji tey vitjandi eru, sum vitja í Koltri.



*Teinæringurin Brandur Sigmundarson*

2017 endaði við, at teinæringurin *Brandur Sigmundarson* var á vitjan, og 2018 byrjaði við, at eitt svenskt filmslið kom á vitjan. Hetta er ikki fyrstu ferð, at Koltur er partur av filmsupptøkum. Hesaferð var talan um upptøkur til svenska filmin *"Fågelfångarens son"*.

Limir úr Føroyanevndini hjá Fólkatinginum, við Magna Arge sum formanni, hevur verið í Føroyum á vitjan fyri at kunna seg um ymisk føroysk samfelagsviðurskifti. Í hesum sambandi vitjaðu tey á Tjóðsavninum í Koltri.

**Vitjandi ferðafólk í Koltri**




*Talan er serliga um summarhálvuna, at fólk vitja í Koltri. Mai 2016 vóru t.d. 440 vitjandi Oyggjadagin, og árið eftir varð Oyggjadagurin avlýstur*

**Meting um vitjandi ferðafólk í Koltri**

| | Samanlagt | | Tjóðskapur | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Ár** | **Ferðaløg** | **Persónar** | **Føroyingar** | | **Norðurl.** | **Onnur** |
| 2015 | 62 | 1.502 | 1.502 | 77% | 189 | 161 |
| 2016 | 120 | 1.734 | 1.437 | 83% | 205 | 92 |
| 2017 | 83 | 1.271 | 935 | 74% | 285 | 51 |
| **Miðal** | **88** | **1.502** | **1.175** | **78%** | **226** | **101** |

*Legg til merkis, at oyggjadagurin 2017 varð avlýstur. Vanliga eru omanfyri 400 fólk á vitjan í Koltri oyggjadagin*





*Akurskurður í Koltri septembur 2018*

Fyristøðumaðurin tók ímóti og vísti límunum runt í býlinginum Heima í Húsi. Í hesum sambandi var greitt frá søgu Kolturs, virksemi Tjóðsavnsins í oynni og um framtíðar ætlanir og avbjóðingar. Áðrenn gestirnir fóru víðari, bjóðaði Tjóðsavnið gestunum alskyns ábit, sum alt var úr oynni.

### SERMERKTA TEIGALENDIÐ Í KOLTRI

Antikvarisku virðini í Koltri eru fornu leivdirnar frá gamla føroyska bóndasamfelagnum. Hetta, at fólkini ikki hava nútímansgjørt viðurskiftini líka skjótt sum aðrastaðni, og at býlingarnir báðir umboða forna búseting, umgyrd av mentanarlandslagi frá forna og sermerkta teigalendinum Heimi í Húsi, til broytingartíðina, tá ið menn løgdu inn nýggj gerðir og so smátt byrjaðu vinnuligt virksemi, sum vit kenna tað frá kenda bátasmiðinum Niclasi í Koltri.

Ein táttur í savnsarbeiðinum, sum fyristøðumaðurin hevur raðfest, er ein byrjan at varðveita teigalendið og føroyska byggkornið. Teigalendið hevur sín uppruna í fornari velting, tá ið neyðugt var hjá føroyingunum at velta korn og hoyggja til neytini. Einasta hjálpitólið var hakin, og kornið skuldi veltast og sáast á hvørjum ári.

Høvuðsendamálið við teigalendinum er kornveltingin, og fyrimunurin varð heildin, hetta at neyðugt var við korni til matna og hoyggi til fóður. Kornveltingin og teigalendið vóru tá eitt sera gott grundarlag og trygd fyri góðum úrsliti – eitt slag av vistskipan eftir tátíðar umstøðum.

R. Rasmussen skrivar í bókini *Sær er siður á landi*, soleiðis: "Við kornvelting var soleiðis skipað fyri frá fyrndartíð, at maður velti ein sjeyndapart av sínum bø undir korn hvørt ár. Soleiðis kom bøurin at liggja til gras í seks ár millum hvørja velting, og tá meðalbreiddin á einum teigi var okkurt um sjey reinir, var allur bøurin botnveltur í 49 ár".

Leggjast kann aftrat, at bøurin somuleiðis varð taðaður og veittur í sambandi við reinaveltingina.



*Limir í Føroyanevndini hjá Fólkatinginum vitja í Koltri*

# BYGDASØVN

**Flestu av bygdasøvnunum í Føroyum er søvn, sum Landsstýrið hevur góðkent sum "stuðulssøkjandi savn". Hetta merkir, at hesi søvn kunnu søkja stuðul eftir Løgtingslóg um bygdasøvn við mentunarsøguligum týdningi, sum broytt við løgtingslóg nr. 88 frá 17. juli 1986**

**Tað er landsantikvarurin** (Tjóðsavnið), sum vegna Føroya Landsstýri, umsitur lógina. Tað vil í høvuðsheitum siga, at landsantikvarurin hevur eftirlit við bygdasøvnunum, veitir teimum hjálp og leiðbeining og umsitur stuðulsskipanina. Stuðul verður veittur til rakstur og til íløgur – 60% til rakstur og 50% til íløgur, um játtan er til tað.

Tað er Løgtingið, sum á hvørjum ári játtar stuðul til bygdasøvnini. Í 2017 og 2018 søktu bygdasøvnini um ávikavist kr. 3.040.000 og kr. 4.263.000. Játtaði stuðulin var tó kr. 2.462.000 bæði í 2017 og 2018 og tískil gjørdist prosentvísi stuðulin nakað væl lægri, enn lógin heimilar.

Tað er sera ymiskt, hvussu stórt virksemið er á ymisku søvnunum. Tað er alt frá smáum feløgum, sum eiga eina lítla goymslu av lutum, til feløg, sum eiga stórar goymslur, fleiri hús, framsýningarhølir og hava fólk í føstum starvi. Tjóðsavnið leggur dent á í vegleiðing síni, at bygdasøvnini endurspegla tað, sum er serstakt í økinum ella bygdini, sum savnið hoyrir til.



*Seinasta bygdasavnið, ið varð góðkent, var Hvalbiar Sóknar Fornminnis- og Kolasavn. Ætlanin hjá savninum er millum annað at byggja uppaftur gomlu kolasmiðjuna í Hvalba.*

## TILSAMANS ERU 22 GÓÐKEND BYGDARSAVN

- Bygdarsavnið "Forni"
- Eiðis Bygdarsavn
- Gøtu Fornminnissavn
- Fornminnissavnið á Mýri, Hovi
- Hvalbiar Sóknar Bygdar- og Kolasavn
- Kollafjarðar Bygdarsavn
- Bygdarsavnið "Gamli Skúli", Leirvík
- Miðvágs Bygdarsavn
- Nes Sóknar Bygdarsavn
- Nólsoyar Bygdarsavn
- Norðoya Fornminnasavn
- Porkeris Bygdarsavn
- Sandavágs Bygdarsavn
- Sands Bygdarsavn
- Sjóvar Fornminnasavn
- Skopunar Bygdarsavn
- Skúvoyar Bygdarsavn
- Sunnbiar Sóknar Bygdasavn
- Sørvágs Bygdarsavn
- Tórshavnar Býarsavn
- Tvøroyrar Bygdar- og Sjóvinnusavn
- Vágs Sóknar Bygdarsavn
- Vestmanna Bygdarsavn

# Mentanarsøgulig skip



MS Thorshavn



Dragin KG 212



Norðlýsið TN 24

**Landsantikvarurin** (Tjóðsavnið) umsitir vegna Føroya Landsstýri stuðulsskipanina til mentanarsøgulig skip sambært *kunngerð um átekning og stuðul til mentanarsøgulig skip, sum broytt við kunngerð nr. 124 frá 6. desembur 2016*. Endamálið við skipanini er at stuðla varðveitsluni av søguligu skipum okkara, og at halda hesi í upprunalíki.

Í 2017 og 2018 vóru 5 skip í skipanini og fingu øll skipini stuðul bæði í 2017 og 2018. Løgtingsjáttanin var bæði árini kr. 850.000 og var peningurin játtaður til rakstur og til íløgur hjá skipunum. Alt eftir hvussu tørvurin er, broytist býtið millum rakstur og íløgur ella umvælingar. Býtið var soleiðis, at í 2017 fór 59 prosent av játtanini til rakstur og 41 prosent til íløgur og umvælingar. Í 2018 var býtið nakað tað sama; tá fór 58 prosent av játtanini til rakstur og 42 prosent til íløgur og umvælingar.



Johanna TG 326



Westward Ho TN 54

# Vitjanir á Tjóðsavninum

**28. januar 2017 hevði savnið vitjan av Arnajaaq Lynge, skrivara í grønlendska granskingarráðnum, Nunatsinni Ilisimatusarnermik Siunnersuisoqartigiit, sum var komin til Føroya at kunna seg um føroyskar vitanar- og vísindastovnar.**

**Norðurlendskur tjóðsavnstjórafundur í Føroyum 16. - 18. august 2017**

Tjóðsavnið var vertur fyri ársfundi hjá stjórunum á norðurlendskum mentanarsøguligum tjóðsøvnum. Við á fundinum vóru stjórar og leiðsluumboð fyri tjóðsavnið í Finnlandi – Kansallismuseo, Ålands Museum og Ålands Sjöfartsmuseum, Statens Historiska Museer og Nordiska Museet í Svøríki, Kulturhistorisk Museum og Norsk Folkemuseum í Noregi, Þjóðminjasafn Íslands, Nationalmuseet í Danmark og Tjóðsavnið.

Endamálið við fundinum er at kunna hvønn annan um gongdina og rákini, sum eru í tíðini. Á hesum fundinum varð tosað um ymisk felags og serstøk viðurskifti hjá søvnunum og virkseminum hjá hesum. Fundurin varð hildin í søguligu íbúðini í H.N. Jacobsens Bókahandli, Gamla Bókahandli, har evni so sum vitjanartøl, sparingar, miðlan, framsýningar og átøk vórðu umrødd. Rigmor Dam, landsstýriskvinna í mentamálum, bar fram røðu.



Útferð varð gjørd til hvalastøðina við Áir. Har varð greitt frá varðveitingarætlanini og víst runt. Fundurin helt fram á Gamla Seglvirkinum í Klaksvík, har tosað var um, hvussu søvn menna sínar samlingar, hvat søvn taka inn, um talgilding, úrskiljing og endurskoðan av samlingum. Vitjað varð eisini hjá Gøtu Fornminnissavni við rundvísing í gomlu kirkjuni, Blásastovu og Glyvra-Hanusarhúsi, og í framsýningini hjá Tjóðsavninum í Brekkutúni.



## VITJANARTØL TIL FRAMSÝNINGARNAR 2017 OG 2018




# FRAMSÝNINGIN Í BREKKUTÚNI

**Í 2018 vitjaðu í alt 11.649 fólk framsýningina í mun til 7.713 í 2017. Hetta er ein hækking upp á 51%. Í 2018 vóru 57% av teimum vitjandi útlendingar, og hetta býtið hevur verið á leið tað sama øll árini.**

**Tað, sum vit serliga fegnast um er**, at talið á føroyingum, sum hava vitjað søvnini, er meiri enn tvífaldað í 2018 í mun til árið frammanundan, og at tað ongantíð hevur verið so høgt sum nú.

Umfram nógva góða umtalu og fleiri vitjandi á Savnsfagnaðinum, er ein orsøk til økta vitjanartalið serframsýningarnar, sum hava verið; onnur var 'Seglframsýningin' í Finsen í Havn og hin serframsýningin var í Fuglafirði og kallaðist 'Karmur um handverk og skapandi evni'. Báðar serframsýningarnar vóru síðani sýndar fram í Brekkutúni.

Eisini er tað áhugavert at síggja, at talið á børnum og næmingum, sum vitja framsýningina, er alsamt vaksandi.

### SAVNSFAGNAÐURIN

Savnsfagnaðurin, ið er ein fastur táttur í heystfrítíðini, fær støðugt fleiri vitjandi, og í 2018 taldust tey vitjandi 1.602 fólk, sum er 25% meiri enn í 2017.

### HOYVÍKSGARÐUR

Vitjandi í framsýningini í Brekkutúni hava ókeypis atgongd til Hoyvíksgarð – og umvent.

Á sumri í 2018 gjørdu savnsvaktirnar ein stóran innsats at greiða teimum vitjandi frá, hvar Hoyvíksgarður liggur, og góvu teimum eitt kort, soleiðis at tey funnu oman gjøgnum hugnaligu gøtuna til gongu. Vitjanartalið í Hoyvíksgarði vaks við næstan 50 % í 2018.

Hoyvíksgarður hevur bara opið summarhálvuna, t.v.s. frá hálvum mai til hálvan septembur.

### Vitjandi á Savnsfagnaðinum hjá Tjóðsavninum

25% fleiri í 2018





*Minningarorð um*

# Onnu Mariu

## plantufrøðing okkara

**Anna Maria Fosaa** varð fødd 20. februar í 1955 í Havn, har hon eisini vaks upp. Hon kom á Náttúrugripasavnið longu í 1980, tá sum hjálparfólk hjá plantufrøðinginum, Jóhannes Johansen, sála. Hon fór síðani niður at lesa, og fekk í 1987 prógv innan lívfrøði við lærda háskúlan í Keypmannahavn. Hennara áhugi var plantur, plantuvistskipanir og veðurlagsbroytingar, helst kveikt frá tíðini á Náttúrugripasavninum; og hennara serritgerð var innan plantufrøði. Heimafturkomin fór hon í 1988 í starv sum fulltrúi í Landsstýrinum, har hon m.a. hevði mál um hval, aling og veðurlagsbroytingar um hendur.

Í 1996 tók Anna Maria við starvi sum deildarleiðari á plantudeildini á Náttúrugripasavninum. Sostatt kom hon aftur á stovnin og fór at røkja júst sama starvsøkið, har sum hennara yrkisleið byrjaði. Tað var okkum týðiligt, at hetta var tað, hon allarmest hevði ynskt.

Stutt eftir at Anna Maria byrjaði á Náttúrugripasavninum, gjørdist hon hjálparlærari á skeiðum fyri læraralesandi. Tá kundi hon aftur brúka royndirnar, hon hevði úr Danmark, har hon longu hevði undirvíst á hægri støði. Í 2002 bleiv hon knýtt at Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum, har hon fekk ábyrgd fyri allari undirvísingini í plantufrøði.

Umframt at røkja starvið sum deildarleiðari, var Anna Maria ein virkin granskari. Hon tók lut í stórum altjóða verkætlanum, m.a. um avleiðingarnar av veðurlagsbroytingum á plantulívið. Í sínum starvi gjørdi hon drúgt og rúgvismikið rannsóknararbeiði í fjøllum okkara. Hesi úrslit miðlaði hon í vísindaligum greinum, frágreiðingum og bókum. Anna Maria umboðaði okkum í altjóða og norðurlendskum høpi, eitt nú í Flora Nordica verkætlanini og í tí Evropeiska plantuatlasinum. Eisini var hon eitt tíðarskeið forkvinna í Fróðskaparfelagnum.

Í 2003 vardi Anna Maria Ph.D. heitið við Lunds Universitet við heitinum "Mountain Vegetation in the Faroe Islands in a Climate Change Perspective".

Árini 2009 og 2010 var Anna Maria stovnsleiðari á Náttúrugripasavninum. Hesa uppgávuna røkti hon væl, og við virkisfýsni setti hon stór mál fyri allan stovnin, m.a. við at styrkja samleikan við sjónligari virknari heimasíðu, regluligari almennari kunning og nýggjari visjón.

Anna Maria røkti starvið á Náttúrugripasavninum, til hon legðist sjúk fyri einum lítlum ári síðani.

Anna Maria var við í tveimum bókaútgávum og var næstan liðug við sína egnu, tá hon andaðist. Undanmaður hennara í starvinum sum plantufrøðingur á Náttúrugripasavninum, Jóhannes Johansen sáli, hevði latið inn handrit til nýggja føroyska floru, tá hann brádliga andaðist í 1995. Tá hon hevði tikið við starvinum, varð heitt á hana saman við øðrum at gera floruna lidna til útgávu. Hon kom út í 2000. Í 2006 kom bókin "Føroya náttúra, Lívfrøðiligt margfeldi, har hon eisini stóð sum ein av ritstjórunum. Hon gav eisini smærri bóklingar um plantur út gjøgnum árini. Men hennara stóra áhugamál var skónir. Tað var evnið í høvuðsuppgávu hennara, tá hon tók sína útbúgving. Hon savnaði saman tilfar til eina bók um føroyskar skónir, og tá hon brádliga gjørdist sjúk, var hon næstan liðug. Við góðum stuðli frá sínum nærmastu, eydnaðist henni at gera handritið til bókina so mikið liðugt, at onnur kundu taka yvir, tá hon ikki megnaði meira. Bókin "Skónir í Føroyum" kom út 13. desembur 2018.

Hon vildi eisini gera tilfar fólksligt og atkomuligt. Og tað sæst við m.a. sjónvarpssendingunum um Villblómur í Føroyum.

Vit sum starvaðust saman við henni, minnast hana sum ágrýtna og nærlagda í sínum virki. Hon metti, at tað var sera týdningarmikið við eini virknari gransking av føroysku náttúruni, so at vit kunnu verja hana á frægasta hátt. Hon hevði greiðar meiningar um, hvat skuldi gerast og ikki.

*Anna Maria andaðist hósdagin, 13. septembur 2018, 63 ára gomul*

*Friður veri við minninum um Onnu Mariu Fosaa*

*Starvsfelagar*



## STARVSFÓLK GIVIN Í 2017 OG 2018

Tann 1. septembur í 2018 segði Regin Debess starvið sum savnslærari frá sær eftir 16 ár á savninum.

Tann 13. septembur 2018 andaðist Anna Maria Fosaa, plantufrøðingur. Minningarorð um Onnu Mariu eru skrivað aðrastaðni í ársfrágreiðingini.

## STARVSFÓLKASETANIR Í 2017 OG 2018

Tá Fornminnissavnið og Náttúrugripasavnið vórðu skipað í Tjóðsavn Føroya, varð lýst eftir nýggjum stjóra til nýggja stovnin, og tann 1. august í 2017 tók Herleif Hammer við sum stjóri á Tjóðsavninum.

Tann 1. desembur í 2017 varð Rannvá Dahl sett sum skrivstovufólk, og við ársbyrjan í 2018 varð Sanna Hansen sett sum fíggjarfulltrúi á Tjóðsavninum.

Á vári í 2018 var søkt eftir savnsvørði at hava um hendur miðlanina av Tjóðsavninum, og í mai byrjaði Rannvá Winkler í nýstovnaða starvinum.

Tann 1. novembur tók Tórarinn N. á Rípuni við starvinum sum savnslærari fyri Regin Debess.

*Starvsfólk 2017-2018:*


Sanna Hansen
*Fíggjarfulltrúi*


Rannvá Dahl
*Skrivstovufólk*


Herdis H. Jacobsen
*Savnshjálpari*


Ólavur H. Øster
*Savnsteknikari*


Bjørn Patursson
*Fyristøðumaður, Koltur*


Elsuba Olsen
*Bókhald*


Bjarni Mikkelsen
*Lívfrøðingur. Hvalagranskingin*


Høgni Arnbjarnarson
*Lívfrøðihjálpari*


Palli Askham
*Savnslærari/KT-vørður*


Rannvá Winkler
*Savnsvørður*


Herleif Hammer
*Stjóri*


Erland Viberg Joensen
*Savnvørður, fólkalívsdeild*


Jan Sørensen
*Savnvørður, sjódjóradeild*


Símun V. Arge
*Ráðgevi og granskari*


Tórarinn N. á Rípuni
*Savnslærari*


Josefina Dam Haraldsen
*Journal*


Hákun Andreasen
*Savnsteknikari*


Jóannes Stephansson
*Savnsteknikari*


Súsanna Joensen
*Konservator*


Jón Aldará
*Lívfrøðingur*


Kim Clementsen
*Húsavørður*


Helgi Michelsen
*Savnvørður, fornfrøðisdeild*


Janus Hansen
*Savnvørður, landdjóradeild*


Tórálvur Weihe
*Savnsarkitektur*


Regin Debess
*Savnslærari*

## BÓKAÚTGÁVUR OG GREINAR

# SKÓNIR Í FØROYUM

**Tjóðsavnið gav um heystið 2018 út bókina Skónir í Føroyum, eftir Onnu Mariu Fossaa, sálu. Anna Maria var plantufrøðingur og starvaðist síðani 1996 á Føroya Náttúrugripasavni, sum nú er partur av Tjóðsavninum. Hon hevur altíð havt stóran áhuga fyri skónum, og hennara serritgerð til Master prógvið í 1987 var um skónir í Føroyum**

Sum aðrir føroyskir granskarar mátti hon arbeiða innan nógv ymisk øki. Hennara doktararitgerð í 2003 var um plantuvøkstur á føroysku fjøllunum við serligum atliti at veðurlagsbroytingunum.

Hóast hetta fjølbroytta virksemið var áhugin fyri skónum tó framvegis líka stórur, og tí fór Anna Maria fyri nøkrum árum síðani undir at fyrireika eina bók um evnið. Í bókini verður kunnað um ein part av okkara náttúru, sum flestu føroyingar munnu hava sæð túsund ferðir, men sum fáur man hava hugsað nógv meira um. Bókin er úr góðum tilfari, soleiðis at hon er løtt av hava sum eina hondbók við sær út í náttúruna. Í bókini er fyrst ein almenn lýsing av skónum, og hvar tær eru at finna í føroysku náttúruni. Síðani verða næstan hundrað úrvald føroysk sløg av skónum lýst við teksti og myndum. Aftast í bókini er yvirlit yvir skrásettar skónir, føroysk heiti og heimildir.

Grunnurin *Føroya Náttúra-Føroya Skúli* stuðlaði bókaútgávuna.

Í sambandi við útgávuna skipaði Tjóðsavnið fyri almennari móttøku í Brekkutúni 6 hósdagin, 13. desembur. Tiltakið eydnaðist væl og vóru okkurt um 150 fólk møtt upp til tiltakið.

Eftir at Herleif Hammer, stjóri, hevði boðið vælkomin, segði Palli Askham nøkur orð um starvsfelagan gjøgnum mong ár, Onnu Mariu Fossaa. Síðani legði Bogi Hansen fram bókina vegna Onnu Mariu. Eftir framløguna sang Eivør Pállsdóttir nøkur løg. Tiltakið endaði við, at Tjóðsavnið bjóðaði ein drekkamunn.






Nógu fólk vóru til móttøkuna

# FORNMINNI Í KIRKJUBØ

**Tjóðsavnið gav í endanum á 2018 út nýggjan bókling: "Fornminni í Kirkjubø – Biskupssætið Føroya í miðøld"**

Útgávan var liður í miðlan savnsins av mentanararvinum á hesum serliga staði. Í høvuðsheitum fevnir hesin mentanararvur um leivdirnar av stórbæru dómkirkjuni, sum vit vanliga nevna Múrin, um sóknarkirkjuna, ið er einasta miðaldarkirkja, ið enn er í brúki í Føroyum, um lítlu kirkjutoftina úti á Líkhúsfløtti, og um tað, sum eftir er av biskupsgarðinum. Gamli bispagarðurin er í dag partvíst kjallari undir miðaldarligu bóndahúsunum í Kirkjubø.




Bóklingurin er ein dagføring av bóklinginum, ið Føroya Fornminnissavn og Føroya Fornminnagrunnur góvu út í felag í 1989. Símun V. Arge, ráðgevi og granskari á Tjóðsavninum, skrivaði bóklingin, ið varð prentaður á fýra málum – á føroyskum, donskum, enskum og týskum.






Leitað verður eftir skógarmottum

# ÚTGÁVUR

**Erland Viberg Joensen** 2017: *Havnin við havið var hon einaferð. Ein býur er fluttur heimanífrá*. Varðin mentanarrit –bind 84, hefti 2. (84-109) Felagið Varðin, Tórshavn

**Helgi D. Michelsen**: Sind die Gebetshausruinen die ältesten Kirchenruinen auf den Färöern?. Ihr Nordland Führer 2017/18

**Helgi D. Michelsen**: Fornfrøðilig lýsing av grevstrum í Mykinesi. Í *Súlan er góð* eftir Janus Mohr. Hoyvík 2018

**Símun V. Arge**: Biskupssetrið í Kirkjubø og siðaskiftið – eitt fornfrøðiligt íkast til Luther-árið í Føroyum. *FRØÐI* 2. 2017 Tórshavn

Medlock J.M., Hansford K., Vaux A.G.C., Simonsen W., Jensen J.-K., Joensen C., Versteirt, Veerle, Hansen, Leivur Janus (2017) Surveillance for Ixodes ricinus ticks (Acari, Ixodidae) on the Faroe Islands. Ticks and Tick-borne Diseases 8, 190–195

Í 2017 kom grein um skógarmottur í Føroyum í tíðarritið Ticks and Tick-borne Diseases. Her var víst á, at títtleikin av skógarmottum var nógv øktur síðstu árini, og at leitan kring landið staðfesti, at tær eisini eru at finna í vøkstri uttandura. Greinin var m.a. grundað á skógarmottur í savninum hjá Tjóðsavninum og á leitan kring landið í 2015. Tá vóru útlendskir granskarar í Føroyum fyri at leita eftir skógarmottum og fyri at leggja føroyingum lag á.



# MIÐLAN



*Erland Viberg Joensen*

- **Erland Viberg Joensen** hevði 9. oktobur 2017 stuttu framløguna *Ferðandi og vitjandi – tað hava tey sagt um okkum. Ferðafrásagnir og onnur brot* (Savnsfagnaður 2017).
- **Erland Viberg Joensen** tók lut í filminum *Stríðsmenn í Havn – Havnar Arbeiðsmannafelag 100 ár*. (Framleiðsla: Uni Arge og Hans Petur Hansen. Havnar Arbeiðarafelag 2017).
- **Erland Viberg Joensen** hevði 19. oktobur 2018 framløguna: *Hvalastøðin og framtíðin – soleiðis kunnu vit eftir ætlan ganga millum húsini.* (Mentanardagar 2018 hjá Sunda Kommunu).
- **Erland Viberg Joensen** hevði 19. oktobur 2018 stuttu framløguna *Tá ið søgan er skitin og slitin – Hvalastøðin við Áir í Føroyum og Nordafar-støðin í Grønlandi.* (Savnsfagnaður 2018).
- **Erland Viberg Joensen** tók tann 20. august 2018 lut í upptøku hjá suðurkoreanskum sjónvarpsliði, MBC-TV, um føroyska fólkamentan í framsýningini í Brekkutúni.
- **Erland Viberg Joensen** undirvísti tann 29. oktobur 2018 í býarsøgu og býarskipan á Føroya Fólkaháskúla: *Havnin 1900-2000 – menning og vøkstur.*
- **Símun V. Arge og Helgi D. Michelsen**: Framløga um fornfrøðiligu rannsóknirnar heima á Sandi fyri túr-operatørum innan ferðavinnuna. 23.10.17
- **Símun V. Arge og Helgi D. Michelsen**: Framløga um fornfrøðiligu rannsóknirnar heima á Sandi fyri faklærarum á Tekniska Skúla í Havn. 25.10.17
- **Símun V. Arge og Helgi D. Michelsen:** Framløga um fornfrøðiligu rannsóknirnar heima á Sandi og antikvarisku avbjóðingarnar har við atliti at ætlaðum kirkjuhúsi. Føroya Stiftsstjórn skipaði fyri fundinum 01.12.17
- **Helgi D. Michelsen**: Framløga: Vitjandi skapa ófrið og kaos í 1808 – ein knappur lá eftir. Savnsfagnaður 2017. Tjóðsavnið 13.10.17
- **Helgi D. Michelsen:** Fyrilestur: Brúk av georadara og 3D-skráseting í Fornfrøðini. Dømi: Bønhúsverkætlan og Niðri á Bakka á Velbastað. Í Sólarmagn 02.04.17
- **Helgi Dahl Michelsen:** Framløga: Skráseting av krígsminnum. Saman við Jon S. Hansen, Vága Kommuna. Á Giljanesi í sambandi við Savnsfagnaðin í Vágum 21.04.18
- **Helgi D. Michelsen:** Fyrilestur: Nýggj fornfrøði. Dømi: Bønhúsætlanin. Á Háskúlanum 25.01.17.
- **Helgi D. Michelsen:** Framløga. Talgild Fornfrøði. Í Føroya søga Talgild samstarvinum millum Tjóðsavnið, Savnsgull í KVF, Fróðskaparsetur Føroya, Landsbókasavnið og Skjalasavnið. Miðnám í Vestmanna 01.03.18
- **Helgi D. Michelsen:** Talgild Fornfrøði. Í Føroya søga Talgild samstarvinum millum Tjóðsavnið, Savnsgull í KVF, Fróðskaparsetur Føroya, Landsbókasavnið og Skjalasavnið. Miðnám á Kambsdali 21.02.18
- **Helgi D. Michelsen:** Talgild Fornfrøði. Í Føroya søga Talgild samstarvinum millum Tjóðsavnið, Savnsgull í KVF, Fróðskaparsetur Føroya, Landsbókasavnið og Skjalasavnið. TSK Klaksvík 08.03.18
- **Helgi D. Michelsen:** Talgild Fornfrøði. Í Føroya søga Talgild samstarvinum millum Tjóðsavnið, Savnsgull í KVF, Fróðskaparsetur Føroya, Landsbókasavnið og Skjalasavnið. Miðnámsskúlin í Suðuroy 12.03.18
- **Helgi D. Michelsen.** Framløga: Eyðansstovuskipið. Saman við Philipp Grassel, Ph.d., frá Deutsche Schifffahrtsmuseum í Bremerhaven, Kevin Martin, havfornfrøðingur, Ph.d lesandi í Íslandi. Á Giljanesi 08.11.18
- **Helgi D. Michelsen**: Framløga: Nýggj burðardygg fornfrøði, dronir, georadar, 3D og VR – Helgi. Savnsfagnaður 2018. Tjóðsavnið 17.10.18
- **Leivur Janus Hansen:** Framløga: Djór koma flúgvandi og fúkandi til Føroya. Savnsfagnaður 2017. Tjóðsavnið 11.10.17
- **Leivur Janus Hansen:** Framløga: Hvar fer kjógvin?. Savnafagnaður 2018. 18.10.18
- **Jan Sørensen:** Framløga: Avgusturin sum vitjaði og brast. Savnsfagnaður 2017. Tjóðsavnið 14.10.17
- **Bjarni Michelsen:** Framløga: Ferðing hjá grind. Savnsfagnaður 2018. Tjóðsavnið 19.10.18



# TJÓÐSAVNIÐ Í MIÐLUNUM 2017-18

| | |
|---|---|
| 05.12.18 | **Útvarpið.** Helgi Michelsen um Eyðanstovuskipið |
| 23.11.18 | **Sosialurin.** Tíðindaskriv um bókaútgávu hjá Onnu Mariu Fossaa |
| 08.11.18 | **Góðan Morgun Føroyar.** Helgi Michelsen um Eyðanstovuskipið |
| 18.10.18 | **Nón.** Herleif Hammer um orkuútbyggina í Ergisdali |
| 15.10.18 | **Japanskur Dokumentar** *Islands*. Helgi Michelsen upptraðkar sum serfrøðingur |
| 19.09.18 | **Sosialurin.** Um Húsagarð |
| 14.09.18 | **Dagur og vika.** Bjørn Patursson um kornvelting |
| 13.09.18 | **Nón.** Erland V. Joensen um Hvalastøðina |
| 03.09.18 | **Kvf.fo.** Herleif Hammer um áhugan fyri savnslærarastarvinum |
| 20.08.18 | **Dagur og vika.** Helgi Michelsen um grevsturin Heima á Sandi |
| 11.06.18 | **Útvarpið.** Herleif Hammer um Kirkjubømúrin |
| 30.05.18 | **Sosialurin.** Bjarni Mikkelsen um hvalateljingar |
| 07.05.18 | **Dagur og vika.** Helgi Michelsen um fornfrøðiligar útgrevstrar í Føroyum |
| 04.05.18 | **Dimmalætting.** Klæmint teknar í sambandi við ólógligan grevstur í Klaksvík |
| 03.05.18 | **Nón.** Helgi Michelsen um friðing av fornminnum. Erland V. Joensen um Nordafar |
| 30.04.18 | **Dagur og vika.** Helgi D. Michelsen um, at Klaksvíkar Kommuna grevur fyri lund á Akursmørk |
| 10.04.18 | **Dagur og vika.** Helgi D. Michelsen um funnið langhús Heima á Sandi |
| 02.04.18 | **Útvarpið.** Herleif Hammer um at Klaksvíkar Kommuna grevur fyri lund á Akursmørk |
| 16.03.18 | **Dagur og vika.** Herleif Hammer um bátar á goymsluni |
| 16.03.18 | **Lyst.** Regin Debess rundvísing á framsýningini |
| 15.03.18 | **Nón.** Herleif Hammer um Tjóðsavnið |
| 20.11.17 | **Við Tórði á túri.** Erland V. Joensen á Hvalastøðini við Áir |
| 14.11.17 | **Nón.** Janus Hansen um økið Vesturi á Víkum. |
| 07.10.17 | **Leygardagur.** Palli Askham um heystfagnaðin |
| 20.09.17 | **Sosialurin.** Erland Viberg Joensen. Um gransking og ph.d-lestur |
| 07.09.17 | **Útvarpið.** Bjarni Mikkelsen um sendarar á grindahvalum |
| 04.09.17 | **Sosialurin.** Bjørn Patursson um vitjan og kornakrar |
| 01.09.17 | **Dagur og vika.** Anna Maria Fossaa um strangari krøv í sambandi við innflutning av plantum |
| 17.08.17 | **Summarmorgun.** Helgi Michelsen um langhús heima á Sandi frá víkingatíð |
| 16.08.17 | **Sosialurin.** Símun V. Arge og Helgi Dahl Michelsen um grevstur Heima á Sandi |
| 20.07.17 | **Vitan.** Símun V. Arge um verkætlanna: “Population Genomics of Vikings” á Center for Geogenetics á Statens Naturhistoriske Museer í Keypmannahavn. |
| 17.01.17 | **Vitan.** Símun V. Arge um “fyrstu” føroyingarnar |
| 04.01.17 | **Góðan Morgun Føroyar.** Helgi Michelsen um gripir úr grevstrinum á Velbastað |



*Vitjað var á stórgarðinum Laufás í Eyjafirði*

# Norðurlendski Ríkisantikvar-fundurin 2018 í Íslandi

**Hin 22.–24. august 2018 luttóku umboð fyri Tjóðsavnið, Símun V. Arge og Helgi Dahl Michelsen, í norðurlendska ríkisantikvar-fundinum við Mývatn í Íslandi**

Fundurin er høvi hjá luttakurunum at hittast at umrøða evni, sum eru frammi í tíðini, og at deila royndir við arbeiðinum innan mentanarumhvørvið. Eisini varð í hesum føri norðurlendskur og evropeiskur mentanararvspolitikkur umrøddur.

Eitt av størru evnunum á fundinum í Íslandi var vitjan og atkoma til mentanarumhvørvið, serliga tey viðkvomu – ein spurningur, sum er vorðin sera viðkomandi í Íslandi, serliga av tí serstakliga nógv øktu ferðavinnuni seinnu árini. Kirkjuantikvariskir spurningar – umsitingin av kirkjum og kirkjugørðum, vóru eisini viðgjørdir. Eitt nú hava nøkur Norðurlond serligar avbjóðingar við umsitingini av bygdakirkjum – tað gerast altsamt færri sóknir og minkandi luttøka í kirkjuligum handlingum, tí at talið av kirkjulimum minkar og av stórbýargerðini. Í tí sambandinum var vitjað í Skútustaða kirkju. Onnur evni á fundinum vóru um altjóða samstarv, eitt nú spurningar viðvíkjandi heimsarvinum og luttøku Noregs í Heimsarvsnevndini tíðarskeiðið 2017-2021. Eisini varð nortið við veðurlagsspurningar, um árini ekstremveðurlag fara at hava á mentanarumhvørvi og mentanararv sum heild.



*Ríkisantikvarar 2018.*
*Felagsmynd við Námaskarð*

## VITJAN Á ÍSLENDSKUM TORVGARÐI

Á ársfundunum verður altíð nýtt høvi at vitja støð, sum í vertslandinum eru av serligum týdningi og áhuga. Í Íslandi var høvið at vitja torvgarðin Laufás í Eyjafirði. Hetta var stórgarður har á Norðurlandinum og prestagarður, har prestur búðleikaðist fram til 1936. Tjóðminjasafn Íslands eigur garðin, meðan tað er savnið á Akureyri, ið rekur hann sum savn. Eisini varð vitjað á garðinum Hofstaðir við Mývatn, har fornfrøðiligar rannsóknir hava verið gjørdar í mong ár. Og ikki ber til at hava vitjað í Íslandi, uttan at hava vitjað onkrar av heitu keldunum. Í hesum føri varð vitjað á Námaskarði á Mývatnsleiðini.

Fundurin í Íslandi endaði við, at Tjóðsavnið beyð seg at vera vertur fyri fundin í august 2019.

## NORÐURLENDSKUR RÍKISANTIKVARFUNDUR 2017 Á ÁLANDI

Norðurlendski ríkisantikvarfundurin í 2017 var hildin í Álandi. Øll Norðurlondini vóru umboðað – tó hevði Grønland givið avboð. Á hesum árligu fundum savnast stjórarnir fyri antikvarisku fyrisitingarnar í Norðurlondunum og samskiparar teirra. Umboð úr Føroyum vóru Herleif Hammer og Símun V. Arge.

Fundurin, sum vardi í tveir dagar, hevði fleiri evni á skránni. Tvey av høvuðsevnunum vóru "friðing av nýggjari fornminnum" og "talgilding av mentanararvinum". Fyrra evnið er sera viðkomandi hjá okkum t.d. tá hugsað verður um friðingina av kríggsminnunum frá seinna heimsbardaga, ið var sett í verk fyri fáum árum síðani. Somuleiðis arbeiða vit eins og hini Norðurlondini við talgilding av okkara goymslum og við gerð av talgildum framsýningum.

Í sambandi við fundin var skipað fyri fleiri útferðum og vitjanum. Vitjað var í kirkjum og einum slotti, men serliga áhugaverd var vitjanin í Bomarsund, sum var ein risastórur russiskur herðnaðarskansi frá fyrru helvt av 19. øld. Kring skansan var ein vardur tilhoyrandi býur, sum veitti hermonnunum ymiskar tænastur. Skansin og tilhoyrandi økið var nærum níggju $km^3$ til støddar. Skansin var tó ongantíð bygdur liðugur, tí bretar og fransar tóku skansan í 1854 í sambandi við Krimkríggið. Eisini var vitjað á lítlu oynni Silverskär, har seinna helvt av fundinum var hildin. Oyggin er sera vøkur og hóast hon er lítil, er hon sera væl útgjørd og verður tí nógv nýtt til fundir og ráðstevnur.

Fundurin endaði við, at Þjóðminjasafn Íslands beyð seg fram at vera vertur í 2018.







*Íslendskt torvhús*



*Frá Bomarsund í Álandi*



*Borðreitt var við kaku og snapsi, sum siður er á Silverskær í Álandi*

## TRICHOPTERA SYMPOSIUM

Leivur Janus Hansen luttók á altjóða ráðstevnu í Tailandi 3. til 9. juni 2018. Hann hevði framløgu um várflugur í Føroyum.

## OIKOS

Leivur Janus Hansen luttók á ráðstevnu í Trondheimi 20. til 22. februar 2018. Hetta var ráðstevna, ið norðurlendska felagið Oikos (www.nordicsocietyoikos.org) fyriskipar annaðhvørt ár. Evnið er vistfrøði í Norðurlondum.

ICOM

## ICOM

- 27. august 2018 nevndarfundur á Glyptoteket í Keypmannahavn.
- Erland Viberg Joensen er føroyskt umboð í nevndini hjá ICOM Danmark.
- 22.-23. februar 2018 nevndarfundur og strategiseminar hjá ICOM Danmark á Skagens Kunstmuseer.
- 21.-23. septembur 2017 luttøka á ráðstevnuni ICOM International Conference, Helsingborg: Difficult Issues.
- 19. septembur 2017 nevndarfundur hjá ICOM Danmark á Zoologisk Museum, Keypmannahavn.

## ANSC

Tjóðsavnið tók lut á stýrisfundi í Northern Seas Maritime Museum Network 12.-13. mai 2017. Í 2017 varð fundurin hildin á Fiskeri- og Søfartsmuseeet í Esbjerg. Netverkið er partur av North Sea Maritime Museums Network, ANSC, og hevur áður gjørt fleiri felags framsýningar og havt ráðstevnur um sjó- og fiskivinnusøgu. Limirnir eru: National Maritime Museum Greenwich, Aberdeen Maritime Museum, Musee Portuaire Dunkerque, Museum aan de Stroom í Antwerpen, Het Scheepvaart-museum í Amsterdam, Maritiem Museum í Rotterdam, Deutsches Schiffahrtsmuseum í Bremerhaven, Fiskeri- og Søfartsmuseet í Esbjerg, Stavanger Sjøfartsmuseum og Tjóðsavnið.

Roynt verður at skipa netverkið til eisini at fáa fleiri søvn uppí sum limir. Netverkið verður í løtuni stýrt úr Bremerhaven. Tjóðsavnið luttók ikki á fundinum í 2018.



# FORNMINNIS-NEVNDIN

*Fornminnisnevndin á ástaðarfundi 28. juni 2018 í Ergisdali við Vatnnes í sambandi við útbyggingarætlanir hjá SEV. Helgi D. Michelsen fornfrøðingur greiðir nevndini frá fornfrøðiligu rannsóknunum á staðnum. Herleif Hammer, landsantikvarur, Jóhann Laksáfoss, arkitektur, og Julianna Klett, løgfrøðingur. Andras á Lofti, bachelor í fornfrøði, sum hjálpti Tjóðsavninum í rannsóknini, hyggur at.*

**Fornminnisnevndin virkar sambært løgtingslóg nr. 19 frá 16. septembur 1948 um friðan av fornminnum og bygningum, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 11 frá 19. apríl 1972**

**Landsstýrið** (Mentamálaráðið) setur Fornminnisnevndina við 3 limum, sum eru stjórin á Føroya Forngripasavni (seinni Føroya Fornminnissavn og Tjóðsavnið), ein løgfrøðingur og ein bygningskønur. Tjóðsavnið er avgreiðsla hjá Fornminnisnevndini.

Nevndin hevur m.a. til uppgávu at gera tilmæli til Landsstýrið um, hvat kemur undir ásetingar um jarðføst fornminni, og hvørjir bygningar eiga at friðast, og viðger ymisk mál í hesum sambandi.

Í 2017 hevði nevndin 5 fundir og í 2019 8 fundir, herundir fleiri ástaðarfundir.

### YVIRLIT YVIR FUNDIR HJÁ FORNMINNISNEVNDINI

### 2017

- **7. mars** *Sethúsini úti í Havn í Tinganesi (ástaðarfundur)*
- **28. juni** *Sethúsini úti í Havn í Tinganesi*
- **14. august** *T.F. Thomsen og Varðin Pelagic (ástaðarfundur)*
- **14. august** *Vitjan í Saltsiluni á Drelnesi, í Eystrum í Porkeri og bygdasavninum í Porkeri, Uttan Ánna í Sandvík og í kirkjuni í Sandvík, Sjúrðhúsi í Vági og í neystunum á Vágseiði*
- *13. septembur Havnar kirkja (ástaðarfundur)*

### 2018

- **8. februar** *Húsini á Mýruni undir Ryggi í Havn, SOR-bygningurin í Sørvági, kirkjuhús við Kunoyar kirkju, Faktorhúsini í Klaksvík (standmynd av Elinborg Lützen)*
- **12. mars** *Kirkjuhús við Kunoyar kirkju (ástaðarfundur)*
- **13. mars** *SOR-bygningurin í Sørvági (ástaðarfundur)*
- **17. apríl** *SOR-bygningurin í Sørvági, Kirkjuhús við Kunoyar kirkju, Havnar kirkja (atkoma hjá rørslutarnaðum), Hørgahjallurin í Nólsoy (frábýti av økisfriðaðum øki)*
- **7. juni** *Útbygging hjá SEV í Ergisdali í Hovi*
- **28. juni** *Útbygging hjá SEV í Ergisdali í Hovi (ástaðarfundur)*
- **28. juni** *Vitjan í Botni, við Ryskivatn og í Porkeri*
- **19. juli** *Hvalvíkar kirkja, Húsagarður í Havn*

# BYGNINGADEILDIN



*Í Koytu heima á Sandi*

Høvuðsarbeiðsøkið hjá Bygningadeildini er tann bygningaligi mentanararvurin. Bygningadeildin ger tilmæli til Fornminnisnevndina um friðing av bygningum og um økisfriðingar í hesum sambandi. Harumframt umsitur deildin ymisk loyvi í sambandi við friðaðar bygningar og, um neyðugt, leggur mál um hetta fyri Fornminnisnevndina. Deildin umsitur eisini stuðul til friðaðar bygningar.

Eisini viðger deildin mál um kirkjur, sum eru eldri enn 100 ár, sambært *anordning nr. 888 frá 8. december 1999 om ikrafttræden for Færøerne af lov om folkekirkens kirkebygninger og kunngerð nr. 13 frá 11. februar 2000 um bygningar fólkakirkjunnar*.

Harumframt umsitur deildin gomlu bygningarnar hjá savninum og viðger mál um tilsvarandi bygningar hjá bygdaog ikki bygdasøvnunum.

Í ymsum byggisamtyktum eru eisini serligar ásetingar um gamlar bygningar, og í hvønn mun savnið skal viðgera mál um hesar bygningar ella bygging nærhendis.



# SUMMARY IN ENGLISH

**In 2017 and 2018** archaeological excavation sites in Sandoy and Velbastað gave us some very interesting findings. Furthermore, the work to preserve the ruins of St. Magnus Cathedral continued. In connection to the rise in the building industry of the Faroe Islands, Tjóðsavnið has been involved in a rising number of inspections, excavations, surveying, and the overseeing of various building sites.

**Since the spring of 2011** substantial preservation work has been done to Hvalastøðin við Áir, which is a remnant of an important part of the industrial and maritime history in the 20th Century. This preservation work has continued on e.g. the area on which the whales were cut up, Flensiplanur, the smithy, the bridge, and the building Ketilshús. Furthermore, the buildings have been painted and the area has been cleared. All the buildings at Hvalastøðin við Áir are now in a sound state. The project to preserve Hvalastøðin við Áir has no funds for maintenance and immediate repairs. Public interest in Hvalastøðin við Áir is on the rise and Tjóðsavnið sees to it that both tourists and the Faroese public are regularly imparted with information of this historical site.

**An extensive work** on ringing storm petrels has been done and just under 7000 storm petrels were ringed in 2017 and 2018, excluding the number of ringings of other sorts of birds. Interesting information concerning the flightpattern of the birds was discovered of which one was on the farthest inland distance covered by a starling. A number of interesting information has been gathered through the ringing of the storm petrels, e.g. the findings of birds that have lived a long life amongst these a 14 ½-year-old oystercatcher and a 33-year-old northern gannet. In 2017 a project was established to examine the capacity for reproduction and the bird population of the arctic skua. A new practice for the counting of the arctic skua has been developed, furthermore, Tjóðsavnið has participated in tracing the arctic skua by travellog.

**Tjóðsavnið** has for many years been an active partner in the work to preserve and maintain a continuous diverse flora and fauna in the arctic region – a work rooted in Nordisk Ministerråd. The first report was published in 2018. Tjóðsavnið has also partnered in a project in which the pooling of data from the cataloguing of subsidiary catch from survey trawlings is joined across landmarks and over time in the arctic region. In 2018 Zoologisk Museum in Copenhagen and Tjóðsavnið signed an agreement to return Biofar material to the Tjóðsavnið which, until now, has been stored in Zoologisk Museum. The Biofar material is expected to be returned to the Faroe Islands in 2020-21.

**Tjóðsavnið** works on a project regarding the island of Koltur which involves clearing of the area and reerecting the northern part of the settlement Norðuri í Gerði. The project also involves improving the landing place and exhibition premises on the island.

**After the request** from Greenland to clear the area called Føroyingahavnin and the Nordafar station, Tjóðsavnið has been on the site to investigate the condition of the area. A report on the results of the investigation including recommendations was concluded in January 2018. This report is for the Government of the Faroe Islands and the Government of Greenland to use in their reading and decision-making process on Føroyingahavnin.

**Two books** were published in 2018 by Tjóðsavnið; one was "Fornminni í Kirkjubø" which was published in no less than four languages, the second was "Skónir í Føroyum".

**The number** of visitors to Tjóðsavnið has increased both in 2017 and in 2018. At present they are peaking. Apart from the permanent exhibitions in Brekkutún and Hoyvíkgarð, Tjóðsavnið held two special exhibitions in 2018; one was called "Heimið – karmur um handverk og skapandi evni" (The home – the foundation for creative work and creative talent), the other was "Seglvirkið í Havn" (The Sail loft in Tórshavn). Tjóðsavnið has in the past two years been a visible participant in many interesting conferences and has been the subject of much positive publicity in the media.

**The annual event**, Savnsfagnaður, had as always a great number of visitors. It offered e.g. assignments, play, and storytelling, which both years proved to be especially popular amongst the visitors.



Svanamerktur prentlutur 541 705

**tjodsavnid.fo**

**FRAMSÝNING**
Brekkutún 6
Hoyvík

**FYRISITING**
Kúrdalsvegur 15
Hoyvík
+298 340 500
tjodsavnid@savn.fo